# GREINING OG ÁLIT

# UM

# FRAMTÍÐAR FISKIVINNUFYRISITING

FISKIMÁLARÁÐIÐ UM HEYSTJAVNDØGUR 2017

# INNIHALDSYVIRLIT


INNIHALDSYVIRLIT .... 2

FYRIMÁLI .... 4

1. FISKIVINNUFYRISITINGIN Í FØROYUM .... 6

1.1. Fiskimálaráðið .... 6

1.1.1. Lógarheimild og játtan .... 6

1.1.2. Bygnaður .... 7

1.1.3. Virkisøki .... 7

1.2. Vørn .... 9

1.2.1. Lógarheimild og játtan .... 9

1.2.2. Bygnaður .... 10

1.2.3. Virkisøki .... 11

1.3. Havstovan .... 12

1.3.1. Lógarheimild og játtan .... 12

1.3.2. Bygnaður .... 13

1.3.3. Virkisøki .... 13

2. FISKIVINNUFYRISITINGIN Í ÍSLANDI .... 16

2.1. Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið .... 16

2.1.1. Lógarheimild og játtan .... 16

2.1.2. Bygnaður .... 16

2.1.3. Virkisøki .... 17

2.2. Fiskistofa .... 18

2.2.1. Lógarheimild og játtan .... 18

2.2.2. Bygnaður .... 18

2.2.3. Virkisøki .... 19

2.3. Landhelgisgæsla Íslands .... 20

2.3.1. Lógarheimild og játtan .... 20

2.3.2. Bygnaður .... 20

2.3.3. Virkisøki .... 21

2.4. Hafrannsóknastofnun .... 22

2.4.1. Lógarheimild og játtan .... 23

2.4.2. Bygnaður .... 23

2.4.3. Virkisøki ..... 23
3. FISKIVINNUFYRISITINGIN Í NOREGI ..... 25
3.1. Nærings- og fiskeridepartementet ..... 25
3.1.1. Lógarheimild og játtan ..... 25
3.1.2. Bygnaður ..... 25
3.1.3. Virkisøki ..... 27
3.2. Fiskeridirektoratet ..... 27
3.2.1. Lógarheimild og játtan ..... 28
3.2.2. Bygnaður ..... 28
3.2.3. Virkisøki ..... 29
3.3. Kystvakta ..... 32
3.3.1. Lógarheimild og játtan ..... 32
3.3.2. Bygnaður ..... 32
3.3.3. Virkisøki ..... 33
3.4. Havforskningsinstituttet ..... 34
3.4.1. Lógarheimild og játtan ..... 34
3.4.2. Bygnaður ..... 34
3.4.3. Virkisøki ..... 35
4. SAMANBERANDI GREINING ..... 37
4.1. Markamót millum stjórnarráð og undirskipaðar stovnar ..... 37
4.2. Markamót millum undirskipaðar stovnar ..... 39
5. UPPSKOT TIL FRAMTÍÐAR FISKIVINNUFYRISITING ..... 40
5.1. Fiskimálaráðið ..... 40
5.2. Sjófeingisfyrisiting ..... 45
5.2.1. Stjórin ..... 46
5.2.2. Fyrisitingareindin ..... 47
5.2.3. Eftirlitsdeildin ..... 47
5.2.4. Loyvis- og hagtalsdeildin ..... 47
5.2.5. KT- og samskiftisdeildin ..... 48
5.3. Vørn ..... 49
5.4. Havstovan ..... 50
5.5. Samanumtøka ..... 51
6. UPPSKOT TIL VERKSETANARÆTLAN ..... 53
HEIMILDARFÓLK ..... 55

# FYRIMÁLI

Høgni Hoydal, fiskimálaráðharri, avgjørdi í vár, at farast skuldi undir at fyrireika skipanarligar og bygnaðarligar broytingar í føroysku fiskivinnufyrisitingini. Í uppriti um setning at gera greining og álit um framtíðar fiskivinnufyrisiting, sum fiskimálaráðharrin staðfesti hin 12. apríl 2017, er tilgongdin ásett eftir hesum setningi:

- At lýsa skipan og bygnað í verandi fiskivinnufyrisitingum í Føroyum, Íslandi og Noregi.
- At greina samanberandi skipan og bygnað í verandi fiskivinnufyrisitingum í Føroyum, Íslandi og Noregi.
- At gera uppskot til nýggja skipan og bygnað fyri føroyska fiskivinnufyrisiting í mun til tær uppgávur og heimildir, ið verða lagdar til fiskimálaráðharran sambært lógaruppskoti um fyrisiting av sjófeingi, sum eftir ætlan kemur í gildi 1. januar 2018.
- At gera uppskot til verksetanarætlan fyri nýggja skipan og bygnað fyri føroyska fiskivinnufyrisiting.

Sum lið í fyrireikingunum at tilevna eina greining og álit um eina framtíðar fiskivinnufyrisiting í Føroyum hava fundir verið við avvarðandi myndugleikar í Íslandi, Noregi og Føroyum.

Í Íslandi vóru fundir í Reykjavík týsdagin 9. mai 2017 við ávikavist *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið*, *Hafrannsóknastofnun* og *Landhelgisgæsla Íslands*. Somuleiðis var fundur sama dag í Hafnarfjörður við *Fiskistofa*.

Í Noregi vóru fundir í Bergen hósdagin 1. juni 2017 við *Fiskeridirektoratet*, *Havforskningsinstituttet* og *Kystvakta*. Harumframt var fundur í Oslo fríggjadagin 2. juni 2017 við *Nærings- og fiskeridepartementet*.

Í Føroyum var fundur í Tórshavn fríggjadagin 7. juli 2017 í Fiskimálaráðnum við Vørn.

Undirritaðu, sum hava staðið fyri hesum verki hava nomið sær hollan kunnleika um fiskivinnufyrisitingarnar í okkara grannalondum – Íslandi og Noregi – har vit vóru

serstakliga væl móttikin í einum opnum og upplýsandi anda. Teirra áralongu royndir vístu seg at vera avgerandi til tess at tilevna hesa greining og hetta álit á einum so tryggum og eftirfarandi grundarlagi, sum gjørligt.

Í viðgerðini hevur tað verið neyðugt at avmarka hesa greining og álit til ikki at fevna um framtíðarætlanirnar í Fiskimálaráðnum um at skipa ein Matís stovn í Føroyum og eina føroyska veðurstovu. Tískil verður eitt nú framtíðin hjá veðurstøðini sum deild í Vørn ikki viðgjørd.

Loksins verða spurningar, ið hava við fyrisitingarligar mannagongdir og tilgongdir heldur ikki viðgjørdir vegna tess, at teir somuleiðis verða mettir at liggja uttan fyri setningin at gera greining og álit um framtíðar fiskivinnufyrisiting, sum fiskimálaráðharrin staðfesti hin 12. apríl 2017.

Í Fiskimálaráðnum um heystjavndøgur 2017

| | |
|---|---|
| Herluf Sigvaldsson | Heri Joensen |
| Ingibjørg Thomsen | Andras Marr Poulsen |

# 1. FISKIVINNUFYRISITINGIN Í FØROYUM

Í hesum parti verður fiskivinnufyrisitingin í Føroyum lýst. Greitt verður frá Fiskimálaráðnum, Vørn og Havstovuni. Serligur dentur verður lagdur á lóg og játtan, bygnað og virkisøki.

## 1.1. Fiskimálaráðið

Fremsta uppgávan hjá Fiskimálaráðnum er at vera fyrisiting hjá fiskimálaráðharranum, harundir at virka sum umboð hjá honum og taka avgerðir hansara vegna, eitt nú tá ið samráðst verður um fiskirættindi.

Fiskimálaráðharrin er ovasti fyrisitingarligi myndugleikin á hansara málsøkjum. Uppgávan hjá ráðnum er umvegis regluverk at skipa málsøkini í deildir og stovnar. Sostatt er Fiskimálaráðið yvirskipað leiðsla og myndugleiki hjá undirskipaðum stovnum. Harumframt er Fiskimálaráðið kærumyndugleiki.

Hóast ráðið skal virka yvirskipað innan málsøkini, stendur ráðið fyri avgreiðslum vendar ímóti borgaranum, harundir at avgreiða royndarloyvir og studningar.

### 1.1.1. Lógarheimild og játtan

Fiskimálaráðharrin er tilnevndur sambært § 27, stk. 2, í stýrisskipan Føroya og fyrisitur málsøkini bjarging, búnaðarmál, fiskirannsóknir og gransking, fiskiveiðieftirlit, fiskivinnumál, hvalamál, inntøkutrygd fiskimanna, tilbúgving og trygd eftir § 33, stk. 1, í stýrisskipan Føroya og Fráboðan nr. 109 frá 18. september 2015 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar, sum seinast broytt við fráboðan nr. 17 frá 21. mars 2017.

Á løgtingsfíggjarlógini hevur Løgtingið játtað Fiskimálaráðnum 14,1 mió. kr. at útinna hetta virksemi. Fiskimálaráðið umsitur harumframt hesar árligu játtanirnar (1.000 kr.):

- Stuðul til bjargingarfeløg 2.000
- Fiskivinnuráð og nevndir 440
- Upplýsing um grind 220
- Hvalagransking 1.080
- Fiskivinnuroyndir 8.600
- Flutningsstuðul 2.200
- Útlán og virknar veðhaldsútreiðslur -100

### 1.1.2. Bygnaður

Fiskimálaráðið er skipað í eina stjórnarskrivstovu, eina fíggjar- og starvsfólkadeild, eina fiskivinnustovu og eitt samráðingartoymi.

Stjórnarskrivstovan er felagsheitið fyri skrivstovuna hjá fiskimálaráðharranum, aðalstjóranum og skrivara teirra. Aðalstjórin er umsitingarligi leiðarin í Fiskimálaráðnum. Hann er ovasti ráðgevin hjá fiskimálaráðharranum og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, rakstrinum og menningini í Fiskimálaráðnum. Stjórnarskrivstovan umsitur lutvíst búnaðarmál.

Fíggjar- og starvsfólkadeildin hevur ábyrgd av fíggjarlógarfyrireiking og fíggjarstýring, bókhaldi, roknskaparreglugerð, rakstri, KT, starvsfólkamálum, skjalaskráseting, reingerð og viðlíkahaldi. Deildin umsitur málsøkini bjarging, tilbúgving og trygd og lutvíst búnaðarmál.

Á fíggjar- og starvsfólkadeildin eru fimm starvsfólk, harav eitt teirra er niðursetta tíð.

Fiskivinnustovan hevur ábyrgd av fiskirættindasamráðingum við onnur lond og økisfelagsskapum fyri fiskivinnuumsiting, umframt annað fiskivinnupolitiskt samstarv í norðurlondum, útnorðri og altjóða. Fiskivinnustovan hevur ábyrgd av menning og dagføring av fiskivinnulóggávu og kunngerðum, sum skipa fiskiskapin, ið vinnan virkar eftir, umframt fiskivinnugransking, ið Fiskimálaráðið luttekur í. Tað verður gjørt við grundarlagi í skipanunum fiskivinnuroyndir og royndarloyvi. Fiskivinnustovan umsitur málsøkini fiskirannsóknir og gransking, fiskiveiðieftirlit, fiskivinnumál, hvalamál og inntøkutrygd fiskimanna.

Á fiskivinnustovuni eru sjey starvsfólk, harav tvey teirra eru niðursetta tíð.

Samráðingartoymið hevur ábyrgdina av strandarlandasamráðingum um uppsjóvarfiskasløgini svartkjaft, norðhavssild og makrel. Samráðingartoymið kann umboða Fiskimálaráðið í altjóða málum, ið kunna setast í samband við handils- og marknaðarpolitisk viðurskifti.

Í samráðingartoyminum eru tvey starvsfólk.

### 1.1.3. Virkisøki

Her kann viðmerkjast, at Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, í *delegatiónsskrivi* tók avgerð um at flyta fyrisitingina av fiskiloyvum til Vørn tann 16. august 2012. Í hesum sambandi vóru tvey starvsfólk flutt til Vørn. Síðani eru fleiri *delegatiónsskriv* send Vørn og verða í dag øll loyvir og allar eftirkanningar eftir lógini um vinnuligan fiskiskap gjørdar á Vørn. Eingi starvsfólk eru flutt í hesum sambandi. Ein orsøk til hetta er, at tað krevst

neyvari stýring við kunngerðum, tá ið øki verða flutt til ein stovn og hevur hetta kravt nógva orku av starvsfólkunum eitt nú á fiskivinnustovuni.

Fiskivinnustovan hevur sum áður sagt ábyrgd av fiskirættindasamráðingum við onnur lond og økisfelagsskapum fyri fiskivinnuumsiting, umframt annað fiskivinnupolitiskt samstarv í norðurlondum, útnorðri og altjóða.

Fiskivinnustovan hevur ábyrgd av menning og dagføring av fiskivinnulóggávu og kunngerðum, sum skipa fiskiskapin, ið vinnan virkar eftir, umframt fiskivinnugransking, ið Fiskimálaráðið luttekur í. Tað verður gjørt við grundarlagi í skipanunum fiskivinnuroyndir og royndarloyvi.

Fiskivinnustovan hevur ábyrgdina av yrkisligu ráðgevingini í Fiskimálaráðnum viðvíkjandi fiskivinnumálum, sum skal stuðla undir fiskivinnupolitiskar avgerðir hjá fiskimálaráðharranum, og umsitur og mennir fiskivinnulóggávuna – í høvuðsheitum lógina um vinnuligan fiskiskap. Hetta fevnir harumframt um at skipa fyri, at kunngerðir verða gjørdar í samsvari við lógarásetingarnar. Virksemið á fiskivinnustovuni er sostatt fylgjandi:

- Vegna Fiskimálaráðið, fylgja og luttaka í fiskivinnupolitiskum og yrkisligum tilgongdum, sum røra seg í millumlanda og altjóða høpi
- Ábyrgdina av fiskivinnupolitikkinum í millumlanda og altjóða høpi
- Ábyrgdina av fiskirættindasamráðingum við onnur lond og samráðingum í økisfelagsskapum fyri fiskivinnuumsiting
- Ábyrgdina av føroysku luttøkuni í øðrum fiskivinnupolitiskum og yrkisligum høpi eitt nú útnorður, norðurlendskum, millumlanda og altjóða
- Útnorðurráðið í fiskivinnupolitiskum og yrkisligum høpi
- Norðurlendskt samstarv
- Samskipa luttøkuna hjá fiskimálaráðharranum í norðurlendska samstarvinum og í øðrum høpi
- Umsita fiskiídnaðarmál, harundir marknaðarviðurskifti í breiðum høpi
- Treytir í sambandi við sølu av fiski, harundir umhvørvismerking, sporføri og ”branding”
- Varða av granskingar- og menningarpolitikkinum hjá Fiskimálaráðnum
- Samskipa kunning um fiskivinnupolitisk og yrkislig viðurskifti
- Umsita játtanirnar til fiskivinnuroyndir og upplýsing um grind
- Ábyrgd av flutningsstuðli og inntøkutrygd fiskimanna, ið er lagt til ALS at umsita

Samráðingartoymið hevur ábyrgdina av strandarlandasamráðingum um uppsjóvarfiskasløgini svartkjaft, norðhavssild og makrel. Samráðingartoymið kann

umboða Fiskimálaráðið í altjóða málum, ið kunnu setast í samband við handils- og marknaðarpolitisk viðurskifti.

## 1.2. Vørn

Vørn er stovnur undir Fiskimálaráðnum, ið umsitur virksemi eftir lógini um vinnuligan fiskiskap, harundir umsiting av fiskiloyvum, fiskidøgum og fiskiveiðieftirlit. Harafturat umsitur Vørn leiting og bjarging á sjónum og veðurtænastu.

### 1.2.1. Lógarheimild og játtan

Sambært løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, fyrisitur Vørn fiskiveiðieftirlitið – eftirlit á sjógvi og landi.

Harafturat røkja vaktarskipini, Brimil og Tjaldrið, hjá Vørn uppgávur fyri umhvørvismyndugleikar og Sjóvinnustýrið.

Játtanin til Vørn í 2017:

| 1.000 kr. | Játtan |
|---|---|
| **Fiskiveiðieftirlit (íroknaðar 26 mió. kr. til rakstur av vaktarskipunum)** | 40.900 |
| **Sjóbjarging / MRCC** | 11.900 |
| **Veðurtænasta** | 4.400 |
| **Tyrlutænasta** | 30.100 |
| **Tilsamans** | **87.300** |

Her kann viðmerkjast, at um so var, at Tjaldrið skuldi havt sama virksemi sum Brimil, vildi tað ført við sær, at útreiðslurnar høvdu hækkað við umleið 10 mió. kr. árliga, serliga orsakað av, at ein manning afturat skuldi umborð á Tjaldrið og fleiri útreiðslur høvdu verið til olju og annan rakstur.

Kostnaðurin av at reka umsitingina av fiskiloyvum og eftirlitinum á landi er umleið 15 mió. kr. árliga, og kann raksturin býtast upp soleiðis:

| Heiti | Roknskapur 2016 |
|---|---:|
| **Lønir o.a.** | 7.700 |
| **Ferðing o.a.** | 600 |
| **Telefon og satellitsamskifti** | 1.000 |
| **Keyp av KT-tænastum** | 2.200 |
| **Aðrar rakstrarútreiðslur** | 1.200 |
| **Keyp av útbúnaði** | 800 |
| **Húsaleiga** | 1.500 |
| **Tilsamans** | **15.000** |

### 1.2.2. Bygnaður




Tað sum er mest viðkomandi í hesi frágreiðing er deildin fyri fiskiveiðieftirlit. Á hesi deildini starvast:

| | |
|---|---|
| Deildarstjóri | 1 |
| Eftirlitsfólk | 2 |
| Fulltrúar | 2 |
| Skrivstovufólk | 3 |
| **Tilsamans** | **8** |

Fleiri av starvsfólkunum fáast við fleiri ymiskar uppgávur so tað kann verða trupult neyvt at meta um tal av starvsfólkum á hvørjum øki. Tískil er talið av starvsfólkum einans at meta sum ein leyslig meting.

### 1.2.3. Virkisøki

Virkisøkið hjá Vørn er býtt í trý. Leiting og bjarging, loyvisskipan og fiskiveiðieftirlit, og veðurtænasta.

Fiskiveiðieftirlit á sjónum verður útint av vaktarskipum hjá Vørn og donsku sjóverjuni. Og kann henda uppgávan best samanberast við tað, sum sjóverja í øðrum londum tekur sær av. Umframt at útinna eftirlit í føroyskum sjógvi, luttaka føroysku vaktarskipini eisini í altjóða sjógvi. Her er serliga talan um NAFO og NEAFC skipanarøkini.

Av uppgávum innan fyrisiting av fiskivinnulóggávu kunnu nevnast:

- Skráseting av fiskidøgum
- Skráseting av kvotum og hjáveiðikvotum
- Eftirlit og skráseting av kvotum á fjarleiðum
- Eygleiðaraskipan
- Fylgisveinaeftirlit við skipum
- Góðkenning av innvigingarskipanum
- Eftirlit við upp- og umskiping av frystum fiski *(Port State Control)*
- Eftirlit við avreiðingum hjá føroyskum skipum í útlendskum havnum
- Eftirlit við fiskiloyvum, heruppií fiskidøgum, eginkvotum, felagskvotum og hjáveiðikvotum
- Avgreiða avhendingar av kvotum og fiskidøgum millum føroysk skip á heima- og á fjarleiðum
- Umsita fiskiloyvi, t.e. útskriva fiskiloyvir og ymsar eftirkanningar í sambandi við flyting av loyvum
- Skráseta avreiðingar- og vektarseðlar
- Krevja gjøld inn í sambandi við veiðigjøld (uppsjóvarfiskiskapur og botnfiskur í Barentshavinum)
- Eftirlit við fiskiskapinum hjá fremmandum skipum í føroyskum sjógvi
- Veiðidagbókaskipanin
- Tryggja, at avreiðingar um innvigingarskipanir á virkjum í Føroyum og uttanlands, eru í samsvar við veiðidagbøkurnar

Álagt er Vørn at samstarva við eftirlitsmyndugleikar í øðrum londum. Av øðrum uppgávum hjá Vørn, sum liggja upp at omanfyristandandi virksemi eru:

- Samstarva við MRCC um luttøku av skipunum hjá Vørn í leiti- og bjargingarátøkum
- Samstarva við *Arktisk Kommando Forbindelseselement Færøerne* um eftirlit í føroyskum sjóøki
- Vørn hevur eisini sáttmála við Tryggingarfelagið Føroyar um samstarv. Uppgávur í hesum sambandi, snúgva seg mest um sleip og kavarahjálp
- Vørn hevur eisini sáttmálar við aðrar myndugleikar um eftirlit við eitt nú burturkasti frá skipum og øðrum

## 1.3. Havstovan

Havstovan hevur sum endamál, at vera granskingarstovnur á hægsta vísindaliga støði. Skilja vistfrøðina í føroyskum sjógvi, við bestu gagnnýtslu fyri eyga. Styrkja grundarlagið fyri ráðgeving til myndugleikarnar. Menna samstarvið við fiskivinnuna. Við gjøgnumskygni støðugt at kunna um granskingarúrslit.

Havstovan skal undir lívfrøðiliga burðardyggum fyritreytum gera kanningar av livandi tilfeinginum og umhvørvi tess í føroyskum sjógvi og á havleiðum har føroyska fiskivinnan hevur áhugamál. Hetta skal verða grundarlag undir at kunna landsins myndugleikar, fiskivinnu og almenningin um granskingarúrslit, og ráðgeva um at gagnnýta livandi tilfeingið og umhvørvi tess.

### 1.3.1. Lógarheimild og játtan

Sambært lóg um vinnuligan fiskiskap skal Havstovan á hvørjum ári geva fiskimálaráðharranum upplýsingar viðvíkjandi støðuni í fiskastovnunum á føroysku landleiðunum og á havleiðum uttan fyri føroysku landleiðirnar, sum føroysk fiskifør gagnnýta, og skal gera vísindaligar tilráðingar og metingar samsvarandi endamálinum í lógini.

Játtanin til Havstovuna í 2017:

| 1.000 kr. | Játtan |
|---|---:|
| **Havstovan** | 14.350 |
| **Rakstur av Magnus Heinason** | 10.800 |
| **Útgerð til Magnus Heinason (íløga)** | 600 |
| **Tilsamans** | 25.750 |

Afturat játtanini fær Havstovan uttanhýsis fígging millum 4 og 7 mió. kr. árliga til gransking, sum atknýttir granskarar standa fyri.

### 1.3.2. Bygnaður

Virksemið á Havstovuni er býtt í deildirnar Botnfiskadeildin, Uppsjóvardeildin, Umhvørvisdeildin, Tøkniliga deild, Fuglakanningarstøðin og Umsitingin.

Starvsfólkatalið á Havstovuni er í løtuni 34 starvsfólk, harav ein stjóri, trý starvsfólk í umsitingini, fimtan granskarar og onnur akademisk starvsfólk og trettan havlívfrøðiligir atstøðingar og onnur hjálparfólk. Av teimum eru 25 í føstum størvum, meðan restin er lønt av verkætlanum. Eisini eru tvey parttíðarsett sum royndartakarar á landingarstøðum. Harumframt telur manningin á Magnusi Heinasyni fjúrtan fólk.




### 1.3.3. Virkisøki

Virkisøkini á Havstovuni eru víðfevnd. Ein týðandi partur eru afturvendandi kanningar, ið verða gjørdar á sama hátt ár um ár. Slík tíðarrøð eru neyðug fyri at fáa til vegar dagførda vitan um tilfeingi og tess umhvørvi og fyri at skilja tær náttúrugivnu broytingarnar. Sum dømi kunnu nevnast stovnsmetingar og lívfrøðiligar kanningar av fiski og sjófugli, havfrøðiligar kanningar, ætikanningar, vistfrøðiligar kanningar og yngulkanningar. Hesar kanningar eru grundarlag undir árligu tilmælunum, og tað er eisini í hesum starvi, at meginparturin av vitanini um tað livandi tilfeingið og umhvørvið verður fingin til vegar.

Afturat hesum kanningunum hevur Havstovan ymiskt tíðaravmarkað virksemi, eitt nú granskingarverkætlanir av ymiskum slagi, ið vinna ella myndugleikar hava tørv á,

tíðaravmarkað áherðsluøki, ið stovnurin ella Fiskimálaráðið meta átrokandi ella verkætlanir, ið gerast best saman við øðrum granskingarstovnum.

- ***Stovnsmetingar***

Í lógini um vinnuligan fiskiskap er álagt Havstovuni á hvørjum ári at lata tilmæli um fiskiskap á landleiðini fyri komandi fiskiár. Eitt av grundarløgunum undir tilmælunum eru stovnsmetingar og veiðihagtøl av botnfiski. So hvørt, sum vitanin økist um vistfrøðiligu viðurskiftini, verður hon tikin við í tilmælini. Hetta fevnir bæði um magakanningar av fiski, viðurskiftini hjá føði í sjónum og atferð hjá fiski. Við at taka inn kunnleika um stovnarnar og umhvørvi teirra, kunnu tilmælini og forsagnirnar gerast betri enn við siðbundnu stovnsmetingunum einsamøllum. Havstovan er væl við í so máta og í tann mun ráðini eru til tað, vil stovnurin leggja orku í hesi viðurskifti, fyri at lata so góð heildartilmæli sum gjørligt úr hondum.

Uppsjóvar vistskipanin er í broyting, og hetta ávirkar tilgongd og ferðing hjá uppsjóvar fiskastovnunum. Tá ið samráðast skal um okkara part av hesum tilfeingi, má vitan til. Vitan, ið fevnir um fiskastovnarnar sjálvar, umhvørvi teirra og ávirkan frá umhvørvinum á stovnarnar. Væl meira verður nú gjørt við kanningar av útbreiðslu av uppsjóvarfiski, magakanningar og umhvørvinum hjá uppsjóvarfiski í føroyskum sjóøki. Kanningarnar av uppsjóvarfiski eru nú skipaðar í egna deild, og fleiri fólk eru sett at taka sær av økinum, umframt at fólk, ið eru knýtt at øðrum deildum á Havstovuni eisini partvís fáast við hesar kanningar, ið eru tengdar at uppsjóvarfiski og tess vistskipan.

Ein týðandi partur av stovnsmetingum er at fáa til vegar upplýsingar um einstøku árgangirnar í veiðuni, býtt upp á skipabólkar. Tað verður gjørt bæði fyri botnfiskastovnar og uppsjóvarstovnar og er sera tíðarkrevjandi.

Fyri at gera eina fullfíggjaða stovnsmeting er neyðugt at fáa til vegar samlaðu veiðuna í tali og vekt fyri hvønn aldursbólk fyri hvørt fiskaslag. Hesar upplýsingar kunnu fáast við at taka stakroyndir av landaðari veiðu. Til hesar stakroyndirnar hevur Havstovan fólk á landingarstøðum, sum máta longd og vekt av einstøkum fiskum og senda Havstovuni tilhoyrandi nytrur til aldursgreining saman við upplýsingum um fiskifar og veiðiøki. Tilfarið gevur virðismiklar upplýsingar um støddir av teimum einstøku árgangunum, vøkstur, tilgongd og eisini um veiðimynstrið hjá ymisku pørtunum av flotanum.

Afturat hesum upplýsingum frá veiðuni er eisini neyðugt at fáa upplýsingar um fiskastovnar frá rannsóknum við Magnusi Heinasyni og leigaðum skipum. Upplýsingar um stovnarnar av uppsjóvarfiski verða fingnar til vegar við akustiskum (ekkó-) kanningum og við troling. Tað verður gjørt í samstarvi við rannsóknarskip úr øðrum

londum. Upplýsingar um stovnarnar av botnfiski fáast frá yvirlitstrolingum hjá Magnusi Heinasyni, ið geva okkum eitt mát fyri gongdina í støddini á stovnunum.

- ***Verkætlanir***

Summar verkætlanir gerast best saman við øðrum granskingarstovnum. Hetta eru eitt nú verkætlanir, ið ikki eru avmarkaðar til føroyskt sjóøki, men hava felags áhuga tvørtur um landamørk. Tá finna granskarar í ymiskum londum og granskingarstovnum saman at kanna ávís evni í felag. Hesin møguleikin er øktur munandi, síðani Føroyar fóru uppí granskingarsamstarvið hjá ES. Umframt, at slíkar verkætlanir geva Havstovuni nógv yrkisliga, so eru tær við til at skapa eitt altjóða yrkisligt netverk, ið stovnurin hevur stóra nyttu av. Eisini húsar Havstovan Ph.D. lesandi. Tey geva eitt virðismikið íkast til vitanarstøðið á stovninum.

Týdningurin av tíðaravmarkaðu verkætlanunum skal ikki undirmetast. Tær stuðla undir kjarnuvirksemið á stovninum, eru við til at menna førleikan hjá starvsfólkunum, og tær eru eisini við til at menna granskingarnetverkið úteftir. Eisini fíggjarliga, eru tær ein týdningarmikil partur av stovninum.

# 2. FISKIVINNUFYRISITINGIN Í ÍSLANDI

Í hesum parti verður fiskivinnufyrisitingin í Íslandi lýst. Greitt verður frá *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið*, *Fiskistofa*, *Landhelgisgæsla Íslands* og *Hafrannsóknastofnun*. Serligur dentur verður lagdur á lóg og játtan, bygnað og virkisøki.

## 2.1. Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið

*Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* varð sett á stovn í 2012 eftir at íslendska fiski- og landbúnaðarmálaráðið varð lagt saman við íslendska ídnaðar-, orku- og ferðavinnumálaráðnum. *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* kann sigast at vera tvíbýtt, við einum ráðharra fyri fiskivinnu og landbúnaði og einum ráðharra fyri ferðavinnu, ídnaði og nýskapan.

Íslendska fiskivinnufyrisitingin er samansett á tann hátt, at talan er um fimm ymiskar eindir annaðhvørt beinleiðis í *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* ella sum stovnar undir tí. Hesar fimm eindir eru *Skrifstofa sjávarútvegs og fiskeldis* og *Skrifstofa alþjóðamála*, ið eru deildir í *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* og undir einum verða her nevndar "íslendska fiskimálaráðið", *Fiskistofa*, *Hafrannsóknastofnun* og *Landhelgisgæsla Íslands*, sum tó er stovnur undir *Dómsmálaráðuneytið*. Hesar fimm eindirnar verða lýstar nærri niðanfyri.

### 2.1.1. Lógarheimild og játtan

*Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* er sett á stovn sambært *Lög um Stjórnarráð Íslands* og hevur sínar heimildir sambært *Forsetaúrskurður um skiptingu stjórnarmálefna milli ráðuneyta í Stjórnarráði Íslands*.

*Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* hevði í 2015 eina játtan á 799 mió. ISK. *Skrifstofa sjávarútvegs og fiskeldis* er deildin í stjórnarráðnum, sum situr fyri fiskivinnuni og alivinnuni. *Skrifstofa alþjóðamála*, ið varð skipað 1. september 2017, varðar sum deild av strandarlandasamráðingum, tvíliðaðum samráðingum um fiskirættindi, samráðingum í økisfelagsskapum fyri fiskivinnuumsiting, umframt aðrari altjóða samvinnu bæði viðvíkjandi fiskivinnu og landbúnaði.

### 2.1.2. Bygnaður

Íslendska fiskimálaráðið er sum sagt partur av *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið*. Skipanin er hon, at í *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* eru tveir ráðharrar. Ein fyri

fiskivinnu og landbúnað og ein fyri ferðavinnu, ídnað og nýskapan. Talan er tó bert um ein aðalstjóra fyri alt *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið*. Tað starvast umleið tíggju fólk í *Skrifstofa sjávarútvegs og fiskeldis* og tvey fólk í *Skrifstofa alþjóðamála*, ið samanlagdar samsvara nøkulunda við føroyska fiskimálaráðið. Av teimum eru ein triðingur løgfrøðingar, meðan hini starvsfólkini eru búskaparfrøðingar ella hava útbúgvingar innan fyri fiskivinnu. Sí annars bygnaðin niðanfyri.




## 2.1.3. Virkisøki

Íslendska fiskimálaráðið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av fiskivinnumálum, gransking av fiskastovnum og umsiting og gagnnýtslu av hesum stovnum saman við øðrum sjófeingi og tilfeingi á havbotninum. Harafturat hevur íslendska fiskimálaráðið ábyrgd av at umsita sjálvi havøkini har hetta tilfeingi er. Eisini hevur íslendska fiskimálaráðið ábyrgd av gransking og reglugerðum um framleiðslu av sjógæti, harundir koma reglugerðir um útflutning og innflutning av hesum vørum, eins og reglugerðir um stuðul til gransking, menning og nýskapan innan fiskivinnuna.

Afturat hesum hevur íslendska fiskimálaráðið ábyrgd av strandarlandasamráðingum, tvíliðaðum samráðingum um fiskirættindi, samráðingum í økisfelagsskapum fyri fiskivinnuumsiting, umframt aðrari altjóða samvinnu bæði viðvíkjandi fiskivinnu og landbúnaði.

Íslendska fiskimálaráðið hevur ein lóggávu leiklut á tann hátt, at lógir og reglugerðir verða fyrireikaðar og tilevnaðar har.

Íslendska fiskimáláráðið virkar eisini sum kærumyndugleiki, har borgarar kunnu kæra avgerðir, ið Fiskistofa hevur tikið. Hóast hesa støðu sum kærumyndugleiki tekur ráðharrin ongantíð lut í viðgerðini. Tað eru løgfrøðingarnir, sum viðgera og taka støðu til tær. Á hendan hátt hevur borgarin eitt rættarstig at royna, áðrenn eitt møguliga dýrt og langt rættarmál.

Sum heimildarfólkini søgdu, er ein sokallaður verjugarður millum íslendska fiskimáláráðið øðrumegin og ávikavist *Fiskistofa* og *Hafrannsóknastofnun* hinumegin. Við øðrum orðum, íslendska fiskimáláráðið hvørki leggur seg útí ella roynir at ávirka avgerðir hjá hesum báðum stovnum.

Leggjast skal at enda afturat, at íslendska fiskimáláráðið hevur eisini ábyrgdina av alimálum, umframt fiskiskapi í áum og vøtnum.

## 2.2. Fiskistofa

*Fiskistofa* varð stovnað í 1992 til tess at flyta stýrisuppgávur, sum fyrr høvdu ligið hjá táverandi íslendska fiskimáláráði út úr hesum ráðið. *Fiskistofa* hevur umleið 67 fólk í føstum størvum. Høvuðssætið er í Akureyri, meðan aðrar deildir eru í Hafnarfjörður, Stykkishólmur, Ísafjörður, Höfn og Vestmannaeyjar.

*Fiskistofa* er ein sjálvstøðugur útinnandi stovnur undir *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* og hevur ábyrgd mótvegis fiskimáláráðharranum. *Fiskistofa* hevur útinnandi ábyrgdina av íslendsku lógini um fyrisiting av sjófeingi og tilhoyrandi lóggávu, dagligari fyrisiting av fiskivinnuni, eins og umsjón og eftirliti við, at reglugerðir um fiskivinnufyrisiting verða framdar í verki.

### 2.2.1. Lógarheimild og játtan

*Fiskistofa* er sett á stovn sambært *Lög um Fiskistofu* og virkar samsvarandi hesi lóg. Játtanin var 1.064,5 mió. ISK í 2015.

### 2.2.2. Bygnaður

*Fiskistofa* er skipað á tann hátt, at talan er um fýra deildir undir stjóranum á *Fiskistofa*. Tær eru sjálv deildin hjá stjóranum á *Fiskistofa*, sum umsitur fíggjarmál, starvsfólkamál og góðskueftirlit. Síðan er talan um eina laksa- og sílaveiðideild, eina veiðieftirlitsdeild og eina tænastu- og upplýsingardeild.

Á *Fiskistofa* starvast umleið 67 fólk. Áleið helvtin av hesum starvsfólkunum eru eftirlitsfólk, meðan hini eru serliga forritarar og løgfrøðingar. Her kann nevnast, at tað

starvast tíggju til tólv forritarar á *Fiskistofa*, sum hava ábyrgdina av at menna og samskipa talgildu skipanina við kvota- og veiðiupplýsingum. Eftirlitsfólkini eru býtt í tveir bólkar, eftirlitsfólk á landi og eftirlitsfólk á sjónum. Sí annars bygnaðin niðanfyri.




### 2.2.3. Virkisøki

Sum greitt er frá omanfyri hevur *Fiskistofa* ábyrgd av dagligari umsiting av fiskivinnuni. Meira nágreiniliga fevna uppgávurnar hjá *Fiskistofa* um:

- Skriva út fiskiloyvi og tilluta kvotur til íslendsk fiskifør, eins og at skráseta hesi rættindi
- Skriva út fiskiloyvi til útlendsk fiskifør, sum fiska í íslendskum sjóøki
- Flyta og skráseta flytingar av kvotum millum fiskifør
- Savna inn, skráseta, viðgera og býta út kunning um veiðu og virði av veiðu hjá íslendskum fiskiførum eins og at hava umsjón við dagligu veiðuni hjá hesum somu fiskiførum
- Umsjón við fiskiskapi hjá íslendskum og útlendskum fiskiførum í íslendskum sjóøki/løgdømi
- Umsjón við fiskiskapi, framleiðslu og viðgerð umborð á fiskiførum, sum viðgera veiðuna umborð
- Umsjón við landingum, viging og skráseting av veiðu hjá íslendskum og útlendskum fiskiførum
- Skriva út elektroniskar veiðidagbøkur og hava eftirlit og umsjón við teimum

- Skriva út aliloyvi og elektroniskar framleiðslu dagbøkur eins og umsjón við alivinnuni
- Umsjón við útflutningi og flutningi av fiski eins og loyvisbrøv til útflutning

Tað hevur við sær, at *Fiskistofa* hevur eftirlitsfólk bæði á sjógvi og á landi. Her er samstarv millum *Fiskistofa* og *Landhelgisgæsla Íslands* á tann hátt, at eftirlitsfólk frá *Fiskistofa* fara út við skipunum hjá *Landhelgisgæsla Íslands* at kanna fiskiskapin hjá bæði íslendskum og fremmandum fiskiførum. Eisini eru nøkur eftirlitsfólk, sum eru serútbúgvin at fara longri túrar við verksmiðjuskipum. Harumframt fremja eftirlitsfólk kanningar av landingum, fiskavirkjum og øðrum framleiðslueindum á landi.

*Fiskistofa* umsitur skipanina við umsetiligum kvotum í Íslandi, sonevnda *Individual transferable quota*, sum hevur verið í nýtslu síðan 1984. Eisini umsitur hon eftirlitið við júst hvat hvørt einstakt fiskifar hevur fiskað av hvørjum einstøkum fiskaslagi. Allar hesar upplýsingar verða lagdar í eina telduskipan, sum er tøk á heimasíðu stovnsins til almenningin at síggja. Hesar upplýsingar verða dagførdar dagliga.

## 2.3. Landhelgisgæsla Íslands

*Landhelgisgæsla Íslands* er íslendska vaktar- og bjargingartænastan, ið virkar sum ein ikki-hernaðarligur stovnur, sum uppiheldur íslendska lóg á íslendskum havleiðum og løgdømi. Hann hevur harumframt ábyrgd av leiting og bjarging, trygd á sjónum, eins og trygdareftirliti í sjóøkinum kring Ísland.

### 2.3.1. Lógarheimild og játtan

*Landhelgisgæsla Íslands* virkar sambært *Lög um Landhelgisgæslu Íslands*. Játtanin í 2016 til *Landhelgisgæsla Íslands* var 3.592 mió. ISK. Her kann nevnast, at umleið 30 prosent av samlaðu útreiðslunum hjá *Landhelgisgæsla Íslands* fara til fiskiveiðieftirlit.

### 2.3.2. Bygnaður

*Landhelgisgæsla Íslands* er stovnur undir *Dómsmálaráðuneytið* og er tað ráðharrin, sum tilnevnir stjóran í *Landhelgisgæsla Íslands*. Stjórin verður tilnevndur fyri eitt fimm ára skeið í senn sambært *Lög um Landhelgisgæslu Íslands*. Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av stovninum og ráðgevur *Dómsmálaráðuneytið* um mál, sum viðkoma stovninum.

Starvsfólkatalið á *Landhelgisgæsla Íslands* er skiftandi frá 130 – 170 starvsfólk. Av teimum eru manningar á átjan fólk til hvørt sjóverjuskip, ið eru fýra í tali, umleið 40 starvsfólk á flogdeildini, her er talan um eitt flogfar og tvær tyrlur, og umleið fjúrtan starvsfólk á sjálvari rakstrarmiðstøðini á landi. Sí annars bygnaðin niðanfyri.




## 2.3.3. Virkisøki

Virkisøkið hjá *Landhelgisgæsla Íslands* fevnir um hesar uppgávur:

- Veita trygd á sjónum sambært íslendskari lóg og altjóða skyldum Íslands eitt nú semjum við onnur lond
- Uppihalda lóg á sjónum, heruppií fiskiveiðieftirlit, eins og at veita hjálp til teir myndugleikar, sum uppihalda lóg á landi
- Leiti- og bjargingartænasta til sjófólk og skip, eins og aðrar flutningsmøguleikar á sjónum
- Leiti- og bjargingartænasta til flogflutning
- Leiti- og bjargingartænasta á landi
- Bráðfeingis sjúkraflutningur
- Veita hjálp til løgregluna annars

- Veita hjálp um vanligt samskifti ikki virkar eitt nú orsakað av ísi, kava, náttúruvanlukkum ella ógvisligum veðri annars
- Eftirlit á sjónum sambært lógini um sjótrygd og øðrum líknandi lógum
- Boða frá og beina burtur reka, minur, bumbur og líknandi, sum er til vanda fyri sjóferðslu, eins og at beina burtur bumbur á landi
- Sjómáting, kortlegging, fráboðanir til sjófólk, fyrireiking av streymtalvum, siglingarleiðum og aðrar fráboðanir um sigling
- Móttaka fráboðanir frá skipum eins og ásett í lóg um fremmandafólk og eftirlit við sjómørkum Íslands

*Landhelgisgæsla Íslands* hevur eftirlitsskip, eftirlitsflogfør, eins og tyrlur, sum verða nýttar bæði til leiting, bjarging og annars eftirlit nærri landi. Á rakstrarmiðstøðini á landi verða øll íslendsk fiskiskip eygleidd umvegis einari kravdari sporskipan. Øll minni før verða fylgd umvegis VHF-skipan við fráboðanum hvørt 30. sekund. Størri før verða fylgd umvegis fylgisvein einaferð um tíman. Fremmand skip, sum virka í íslendskum sjóøki verða eisini fylgd samsvarandi tvíliðaðum semjum. Afturat hesum fær *Landhelgisgæsla Íslands* kunning um sporing frá NEAFC.

Eftirlitsfólk frá *Landhelgisgæsla Íslands* fara umborð á 200 til 400 skip árliga til tess at hava eftirlit við veiðu, veiðiamboðum og trygdarútgerð við tilhoyrandi váttanum og skjølum.

*Landhelgisgæsla Íslands* hevur løgreglumyndugleika og hevur myndugleika at gera handtøkur eins og at nýta vald um neyðugt.

Her kann eisini nevnast, at seinastu árini eru tvær broytingar farnar fram í mun til virkisøkið hjá *Landhelgisgæsla Íslands*. Hesar eru øktan dent á verju ímóti altjóða yvirgangi eins og øktan dent á eftirlit við dálking á sjónum.

## 2.4. Hafrannsóknastofnun

*Hafrannsóknastofnun* varð stovnaður í 1965 og er stovnur undir *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið*. *Hafrannsóknastofnun* hevur sum uppgávu at fremja havlívfrøðiliga gransking og at ráðgeva íslendska fiskimálaráðnum við vísindaligum tilráðingum við støði í stovnsins gransking av sjófeingi og havumhvørvinum.

### 2.4.1. Lógarheimild og játtan

*Hafrannsóknastofnun* er settur á stovn sambært *Lög um Hafrannsóknastofnun, rannsókna- og ráðgjafarstofnun hafs og vatna* og virkar samsvarandi henni. Játtanin í 2015 var 1.776 mió. ISK.

### 2.4.2. Bygnaður

Sambært omanfyrinevndu lóg er tað íslendski fiskimálaráðharrin sum setir stjóran á *Hafrannsóknastofnun*. Stjórin verður settur fyri fimm ár í senn. Á *Hafrannsóknastofnun* eru umleið 130 starvsfólk. *Hafrannsóknastofnun* hevur tvey havrannsóknarskip, fimm deildir kring um í Íslandi og eina havbúnaðarroyndarstovu. Sí annars bygnaðin niðanfyri.




### 2.4.3. Virkisøki

Virkisøkið hjá *Hafrannsóknastofnun* er í høvuðsheitum býtt í trý høvuðsøki. Talan er um eitt havumhvørvisøki, eitt sjófeingisøki og eitt ráðgevandi øki. At enda er eisini eitt fjórða øki, sum er samansett av deildum, ið stuðla virkseminum hjá teimum trimum høvuðsøkjunum.

Havumhvørvisøkið á *Hafrannsóknastofnun* hevur ábyrgdina av at granska sjálvt havumhvørvið, eitt nú hitan í sjónum, føðsluevni og saltinnihaldið í sjónum. Afturat hesum kemur havjarðfrøði og taravistfrøði, eins og æti, yngul, ungfiskur og gransking av havbotninum saman við lívi og vøkstri í djúphøvum. Harafturat tekur havumhvørvisøkið á *Hafrannsóknastofnun* sær av størri verkætlanum, har granskað verður í sjóvarfalli og streymi umvegis fylgisveinar, vetursetu og várgýting hjá djóraæti, eins og kanningar av gýting hjá mest týdningarmiklu fiskastovnunum.

Sjófeingisøkið á *Hafrannsóknastofnun* kannar teir fiskastovnar, sum verða troyttir kring Ísland, krabbadjór, lindjór og havsúgdjór. Størsti parturin av virkseminum hjá sjófeingisøkinum er í sambandi við stovnsmetingar og mest loyvdu veiðu fyri hvønn fiskastovn. Størri verkætlanir hjá sjófeingisøkinum fevna um árligar botnfiskakanningar, kanningar av djúpvatnsrækjum, hummara og jákupsskel. Harafturat verður lodnustovnurin og sildastovnurin kannaður árliga. Av nýggjari kanningum hjá sjófeingisøkinum á *Hafrannsóknastofnun* kann nevnast fleirstovnakanningar, har kannað verður, hvussu stovnar í íslendskum sjóøki ávirka hvønn annan.

Ráðgevandi økið á *Hafrannsóknastofnun* eftirmetir og endurskoðar stovnsmetingar og fyrireikar formligu tilráðingarnar viðvíkjandi mest loyvdu veiðu og burðardyggum umsitingarætlanum til íslendsku stjórnina.

Seinasta økið á *Hafrannsóknastofnun*, ið er tað fjórða, er sum sagt ein samanseting av deildum. Hetta eru deildir so sum myndladeild, ið hevur sum uppgávu at fáast við støddfrøðiligar myndlar innan fiskiveiðu og vistfrøði viðkomandi fyri stovnsmetingar, eins og at loysa ymsar trupulleikar í mun til tey háttaløg, sum verða nýtt til stovnsmetingar. Síðani er ein tøknilig deild, sum umsitur uppseting, viðlíkahald og royndir av granskingartólum og amboðum. At enda er eitt fiskiveiðisavn, har allar bøkur og vísindaligar greinar innan havvísindi, ið eru viðkomandi fyri granskarar hjá *Hafrannsóknastofnun*, verða savnaðar.

*Hafrannsóknastofnun* luttekur eisini í altjóða granskingarsamstarvi um stovnsmetingar og kanningar. Afturat hesum luttekur *Hafrannsóknastofnun* í altjóða fiskirættindasamráðingum, eitt nú strandarlandasamráðingum um svartkjaft, norðhavssild og makrel.

# 3. FISKIVINNUFYRISITINGIN Í NOREGI

Í hesum parti verður fiskivinnufyrisitingin í Noregi lýst. Greitt verður frá *Nærings- og fiskeridepartementet*, *Fiskeridirektoratet*, *Kystvakta* og *Havforskningsinstituttet*. Serligur dentur verður lagdur á lóg og játtan, bygnað og virkisøki.

## 3.1. Nærings- og fiskeridepartementet

*Nærings- og fiskeridepartementet* hevur ábyrgdina av altjóða handli, vinnu og fiskivinnu. Tað hevur tveir ráðharrar, ein ráðharra fyri altjóða handil og vinnu og ein ráðharra fyri fiskivinnu. Eins og í Íslandi, er ein partur av *Nærings- og fiskeridepartementet*, ið virkar sum norskt fiskimálaráð.

*Nærings- og fiskeridepartementet* hevur ábyrgdina av at tilevna framtíðar vinnu- og sjógætispolitikk. Afturat hesum koma øll øki, sum eru viðkomandi í mun til virðisøking. Málið hjá norsku stjórnini í mun til vinnu- og sjógætispolitikk er at fáa sum mest burturúr virðisøking í norska búskapinum.

### 3.1.1. Lógarheimild og játtan

Sambært norsku grundlógini er tað norski kongurin, sum ásetir ymisku stjórnarráðini í Noregi. *Nærings- og fiskeridepartementet* varð sett á stovn við kongaligari fyriskipan 13. desember 2013. Síðani eru tað ráðharrarnir, sum skipa virksemið inni í ráðnum. Játtanin hjá *Nærings- og fiskeridepartementet* í 2017 er 677,8 mió. NOK.

### 3.1.2. Bygnaður

Sum sagt omanfyri, er *Nærings- og fiskeridepartementet* samansett á tann hátt, at talan er um tveir ráðharrar, ein fyri altjóða handil og vinnu og ein fyri fiskivinnu. *Nærings- og fiskeridepartementet* er skipað á ein hátt, sum endurspeglar hetta býtið. Hesir báðir ráðharrarnir hava síðan tveir sokallaðar *statssekretærer* undir sær, sum eitt slag av varamonnum, eins og ein politiskan ráðgeva. Afturat teimum kemur ein sokallaður *Departementsråd* og *Assisterende departementsråd*. *Departementsråd* er hægsti embætismaður í *Nærings- og fiskeridepartementet* og samsvarar við ein føroyskan aðalstjóra. Sí annars bygnaðin niðanfyri.




Í *Nærings- og fiskeridepartementet* eru sum víst omanfyri, níggju deildir ella ráð, harav ein av teimum er *Fiskeri- og havbruksavdelingen*, ið virkar sum norskt fiskimálaráð. *Fiskeri- og havbruksavdelingen* er síðani býtt í tríggjar undirdeildir. Tær eru:

- *Havbruks- og miljøforvaltning*
- *Næringsutvikling - fiskeri og havbruk*
- *Fiskeriforvaltning*

Í alt starvast umleið 350 fólk í *Nærings- og fiskeridepartementet* og 40 av teimum starvast í *Fiskeri- og havbruksavdelingen*. Talan er ikki um eitt greitt starvsfólkabýti millum starvsfólk, sum starvast fyri handils- og vinnumálaráðharran og fiskimálaráðharran. Skipanin er hon, at í grundregluni starvast øll fyri báðar ráðharrarnar.

Tó so, tey sum starvast í *Fiskeri- og havbruksavdelingen* fáast fyri tað mesta við tey mál, sum fiskimálaráðharrin hevur ábyrgdina av. Av teimum 40, sum starvast í *Fiskeri- og*

*havbruksavdelingen* er talan um fyrst og fremst løgfrøðingar, búskaparfrøðingar og fiskivinnufrøðingar og síðani samfelagsfrøðingar, havlívfrøðingar og onnur.

### 3.1.3. Virkisøki

Sum greitt frá omanfyri eru tríggjar undirdeildir í *Fiskeri og havbruksavdelingen*.

- ***Havbruks- og miljøforvaltning***

Hendan undirdeildin hevur ábyrgdina av alimálum, umhvørvismálum og burðardyggleika í alivinnuni. Íroknað er dálking og frárensl frá alivirkjum, fiskaheilsa og vælferð, fóður og tøkni, eins og ávís altjóða mál í mun til ES og EBS.

- ***Næringsutvikling - fiskeri og havbruk***

Hendan undirdeildin hevur ábyrgdina av luttøku í fiskivinnu og veiðu sambært *Deltakerloven* eins og sjálvum býtinum av sjófeinginum. Harafturat hevur hendan undirdeildin ábyrgdina av bygnaðinum í skipaflotanum, loyvisskipanum, atgongdaravmarkingum, eins og búskaparligum og samfelagsligum skipanum innan fiskivinnuna. Undirdeildin hevur eisini ábyrgdina av reglugerðum í mun til alivinnu eins og búskaparliga menning innan alivinnuna, bygnaðinum í vinnuni, loyvum, framleiðsluavmarkingum, økisnýtslu og ognarviðurskiftum.

- ***Fiskeriforvaltning***

Hendan undirdeildin umsitur altjóða fiskivinnumál. Undirdeildin hevur ábyrgdina av millumtjóða samráðingum og semjum um fiskirættindi, eins og samráðingum í økisfelagsskapum fyri fiskivinnuumsiting. Eisini hevur hon ábyrgdina av ólógligum fiskiskapi, harundir altjóða samstarvi innan økið. Hinvegin er tað *Fiskeridirektoratet*, sum umsitur millumtjóða semjur um eftirlit. Undirdeildin tekur sær eisini av málum viðvíkjandi havrætti og málum, sum hava við tann verkliga partin av *Havressurslova*.

## 3.2. Fiskeridirektoratet

*Fiskeridirektoratet* var sett á stovn í Bergen í ár 1900 og er í dag stovnur undir *Nærings- og fiskeridepartementet* og virkar sum høvuðsráðgevandi og útinnandi umsitingarstovnur fyri norsku fiski- og alivinnuna. Endamálið hjá *Fiskeridirektoratet* er at fremja lønandi og virðisøkjandi vinnuvirksemi ígjøgnum burðardygga og brúkaravenda umsiting av sjófeingi og havumhvørvi. Høvuðsuppgávurnar hjá

*Fiskeridirektoratet* fevna um stýrisuppgávur innan fiski- og alivinnu, regluáseting, leiðbeining og eftirlit.

### 3.2.1. Lógarheimild og játtan

Norska skipanin við konginum sum ovasta fyriskipara av bygnaðinum við stjórnarráðum hevur við sær, at tað er ikki nøkur serstøk lóg, sum gevur heimildir til *Fiskeridirektoratet*. Hóast onga lóg er skipanin hon, at *Nærings- og fiskeridepartementet* avhendar myndugleika og heimildir, sum fevna um stýrisuppgávur til *Fiskeridirektoratet* við heimild í *Havressurslova*.

Afturat hesum ger *Nærings- og fiskeridepartementet* árliga eitt sokallað *tildelingsbrev*, sum útgreinar, hvussu *Nærings- og fiskeridepartementet* ynskir, at játtanin til *Fiskeridirektoratet* verður nýtt og hvussu *Fiskeridirektoratet* skal raðfesta innan sínar heimildir. Samlaða játtanin hjá *Fiskeridirektoratet* í 2017 er 486 mió. NOK.

### 3.2.2. Bygnaður

Høvuðssætið hjá *Fiskeridirektoratet* liggur í Bergen. Harumframt er talan um fimm økisdeildir, *Region Nord*, *Region Nordland*, *Region Midt*, *Region Vest* og *Region Sør*. Tær vóru sjey í tali í 2015, men talið er lækkað orsakað av bygnaðarbroytingum seinastu árini.

Somuleiðis verður miðað ímóti at fara frá 28 staðbundnum skrivstovum til 20 staðbundnar skrivstovur í 2017, eins og at ætlanin er at flyta alt skipanarligt eftirlitsvirksemi og málsviðgerð, sum fer fram í fyrstu atløgu, út til økini.

Tað eru um 423 starvsfólk tilsamans í *Fiskeridirektoratet*. Av teimum eru 219 úti á økisdeildunum og 204 á høvuðssætinum í Bergen. Sí annars bygnaðin niðanfyri.




Bygnaðurin er skipaður við fimm deildum á høvuðssætinum hjá *Fiskeridirektoratet* í Bergen, *Ressursavdelingen*, *Kyst- og havbruksavdelingen*, *Statistikkavdelingen*, *Administrasjonsavdelingen* og *IT-avdelingen*. Afturat teimum fimm deildunum eru *Personal- og organisasjonsutviklingsstaben* og *Kommunikasjonsstaben*. Ovastur er *Fiskeridirektøren*.

### 3.2.3. Virkisøki

Í høvuðsheitum fevna uppgávurnar hjá *Fiskeridirektoratet* um:

- At veita serkøna ráðgeving til *Nærings- og fiskeridepartementet* í sambandi við lógar- og kunngerðarsmíð. Talan kann vera um greiningar, hagtøl og ráðgeving annars
- At áseta og útinna reglur fyri virksemið hjá fiski- og alivinnuni
- At útinna politiskar avgerðir
- At viðgera umsóknir og kærur
- At útinna eftirlit
- At kunna ymiskar áhugabólkar og almenningin

Tær ymisku deildirnar á *Fiskeridirektoratet* eru lýstar meira neyvt niðanfyri.

- ***Ressursavdelingen***

*Ressursavdelingen* er samansett av fýra undirdeildum, nevniliga *fartøy- og deltakerseksjonen*, *kontrollseksjonen*, *reguleringsseksjonen* og *utviklingsseksjonen*.

*Fartøy- og deltakerseksjonen* umsitur vinnulig fiskiloyvir, serloyvir og atgongdarrættindi. Eisini umsitur hon yvirlitið yvir fiskifør og sjófólk. Afturat hesum virkar hendan undirdeildin í *Ressursavdelingen* sum kærumyndugleiki í mun til avgerðir, sum eru tiknar á økisdeildunum hjá *Fiskeridirektoratet*, ið fella undir virksemið hjá hesi undirdeild.

*Kontrollseksjonen* hevur ábyrgdina av at samskipa samlaða eftirlitsvirksemið viðvíkjandi sjófeingi hjá *Fiskeridirektoratet*, eins og at gera váðagreiningar og váðastaðfestingar í sambandi við eftirlitsvirksemi.

*Reguleringsseksjonen* fyrireikar reglugerðir við stuttum skotbrái, tá ið neyðugt er at stongja og opna økir í norskum sjóøki. Sostatt fylgir *reguleringsseksjonen* við gongdini í fiskivinnuni, umlutar kvotur og steðgar fiskiskapi í økjum har útrokningar vísa, at kvoturnar eru uppi. Eisini luttekur *reguleringsseksjonen* í samráðingum um kvotur innanhýsis í Noregi og altjóða fiskirættindasamráðingum.

*Utviklingsseksjonen* hevur ábyrgdina av at royna nýggja umhvørvisvinarliga útgerð og veiðiamboð at fiska við, eins og at halda við líka verkligu eginleikarnar í mun til fiskivinnu hjá hesi undirdeild. Hon hevur eisini ábyrgdina av at menna nýggj *harvest models* í mun til sjófeingi.

- ***Kyst- og havbruksavdelingen***

Eins og *Ressursavdelingen*, er *Kyst- og havbruksavdelingen* býtt í undirdeildir, nevniliga *arealseksjonen*, *tildelingsseksjonen* og *tilsynsseksjonen*.

*Fiskeridirektoratet* hevur partsábyrgd av, at alivinnan í Noregi verður umsitin á ein hátt, sum gagnar vinnuni og umhvørvinum í framtíðini. Tískil mennir *Kyst- og havbruksavdelingen* lógir og reglugerðir, viðger kærur og hevur eftirlit við alivinnuni, eins og hon umsitur strandarøki. *Kyst- og havbruksavdelingen* hevur tætt samstarv við *Mattilsynet*, *Havforskningsinstituttet*, *Miljødirektoratet* og kommunurnar.

*Arealseksjonen* tekur sær av økis- og náttúruvarðveiting. *Arealseksjonen* skal eisini hava eftirlit við lívfrøðiligum fjølbroytni og ójavnum, eins og møguligum hoyringum um spill og lekar í sambandi við alivinnuna.

*Tildelingsseksjonen* hevur yrkisliga ábyrgd av útluting og rættindum eftir alilógini.

*Tilsynsseksjonen* hevur eftirlit við rakstrinum hjá alifyritøkum. Eisini hevur *tilsynsseksjonen* ábyrgd av fyribyrgjandi átøkum í mun til, hvussu umhvørvið verður ávirkað.

- ***Statistikkavdelingen***

*Statistikkavdelingen* er býtt í tvær undirdeildir, nevniliga *analyse- og formidlingsseksjonen* og *Norsk Fisheries Monitoring Centre*.

*Analyse- og formidlingsseksjonen* hevur ábyrgd av at savna og góðskutryggja taltilfar til fiski- og alivinnuhagtøl, eins og til kanningar um vinningsføri. Hagtølini verða nýtt bæði í sambandi við umsiting og eftirlit. Eisini framleiðir *analyse- og formidlingsseksjonen* almenn norsk hagtøl, sum verða brúkt til gransking. Afturat hesum fæst *analyse- og formidlingsseksjonen* við umrokningartættir og altjóða skyldir í mun til frágreiðingar.

*Norsk Fisheries Monitoring Centre* eftir hetta FMC hevur eftirlit við øllum fiskiskapi í norskum og altjóða sjóøki. Sum partur av hesum eftirliti, fylgir og mennir FMC elektronisku fráboðanarskipanina. Harundir koma fráboðanir um knattstøðu og fiskiskap.

- ***Administrasjonsavdelingen***

Hendan deildin hevur ábyrgd av starvsfólkum, fíggjarstýring, bókhaldi, skjalasavni og øðrum innanhýsis viðurskiftum.

- ***IT-avdelingen***

*Fiskeridirektoratet* hevur sína egnu KT-deild, sum hevur ábyrgdina av at menna KT-loysnir, ið eru serliga snikkaðar til endamálið. KT-deildin hevur eisini sum uppgávu at viðlíkahalda ymisku KT-skipanirnar og forritini, eins og at ráðgeva ymisku brúkarunum í *Fiskeridirektoratet*.

Afturat teimum fimm omanfyrinevndu deildunum kemur *Personal- og organisasjonsutviklingsstaben*, sum avgreiðir lønarviðurskifti, sjúkrafráveru, starvsetanir, menning av starvsfólki og starvsfólkapolitikk. Og *Kommunikasjonsstaben*, sum í høvuðsheitum tekur sær av samskifti úteftir hjá *Fiskeridirektoratet* eitt nú netmiðlar, innanhýsis samskiftisráðgeving, bóklingar og kunningartilfar. Her kann nevnast, at ein russiskur tulkur er settur í starv at taka sær av russiska partinum av heimasíðuni hjá *Fiskeridirektoratet*.

## 3.3. Kystvakta

*Kystvakta* er ein deild í *Sjøforsvaret* og fevna uppgávurnar í høvuðsheitum um fiskiveiðieftirlit, umhvørvisvernd, leiting og bjarging, umframt tolleftirlit.

### 3.3.1. Lógarheimild og játtan

*Kystvakta* virkar eftir serligari lóg, nevniliga *Kystvaktlova*. Sambært hesari lóg hevur *Kystvakta* í friðartíð ábyrgd av at tryggja norskan sjálvsavgerðarrætt og norskt yvirvald. Játtanin í 2017 er 1.106 mió. NOK.

### 3.3.2. Bygnaður

*Kystvakta* er sum sagt ein deild í *Sjøforsvaret*, ið er undir norska Verjumálaráðnum. Sí annars bygnaðin niðanfyri.




Í 2017 hevði *Kystvakta* trettan ymisk vaktarskip, eins og tvær tyrlur. Tey trettan vaktarskipini hava eftirlit við ymiskum pørtum av norskum sjóøki og eru útgjørd

samsvarandi, millum annað hava tey góða sleipiorku og kunnu taka sær av oljudálking. Her kann nevnast, at vaktarskipini hjá *Kystvakta* eru fækkað seinastu árini. Eisini hevur *Kystvakta* atgongd til tvey eftirlitsflogfør hjá norska flogvápninum, eins og at fjarstýrd flogfør verða nýtt til eftirlitsvirksemi.

Talan er um 26 manningar til tey trettan vaktarskipini og hava øll trettan vaktarskipini heimahavn í Sortland í Norðurnoregi, har *Kystvakta* hevur høvuðsstøð.

### 3.3.3. Virkisøki

Sum víst á omanfyri eru høvuðsuppgávurnar hjá *Kystvakta* fiskiveiðieftirlit á sjónum, umhvørvisvernd, leiting og bjarging, umframt tolleftirlit. Størsti parturin av tíðini og orkuni hjá *Kystvakta* fer til fiskiveiðieftirlit á sjónum og hevur *Kystvakta* fullan løgreglumyndugleika uttanfyri 12 fjórðingar. Her kann nevnast, at av tí, at talan er um so sera stór økir, verða nógvar váðametingar gjørdar.

Uppgávurnar hjá *Kystvakta* fevna annars um:

- Sjúkraflutning
- Tolleftirlit
- Granskingarsamstarv
- Sleiping
- Kavarahjálp til skip
- Umhvørvistilbúgving

Sambært *Kystvaktlova* hevur *Kystvakta* heimild til at útinna eftirlit fyri fleiri almennar stovnar í Noregi. Tískil samstarvar *Kystvakta* tætt við løgreglu, tollmyndugleikar, *Kystverket*, ið hevur ábyrgd av skipaferðslu í norskum sjóøki og *Sjøfartsdirektoratet*, sum er norska Sjóvinnustýrið.

## 3.4. Havforskningsinstituttet

*Havforskningsinstituttet* er ráðgevandi granskingarstovnur beinleiðis undir *Nærings- og fiskeridepartementet*. Stovnurin hevur sjálvstøðugan og óheftan leiklut í mun til allar yrkisligar spurningar.

### 3.4.1. Lógarheimild og játtan

Skipanin í mun til lógarheimild er tann sama, sum fyri *Fiskeridirektoratet* og ger *Nærings- og fiskeridepartementet* eisini *tildelingsbrev* til *Havforskningsinstituttet*. Játtanin til *Havforskningsinstituttet* í 2017 er 947,2 mió. NOK. Afturat hesum kemur ein serlig játtan til rakstur av seks havrannsóknaskipum og at byggja eitt nýtt havrannsóknarskip í 2017. Hendan upphæddin er í 2017 áljóðandi 1.290,8 mió. NOK.

### 3.4.2. Bygnaður

*Havforskningsinstituttet* hevur høvuðssæti í Bergen. Harafturat er ein deild í Tromsø, granskingarstøðir í Austevoll, Matre, Flødevigen og minni støðir í Porsanger og Rosendal. Í 2016 vóru umleið 715 starvsfólk á *Havforskningsinstituttet*. Meira enn helvtin av teimum starvaðust í Bergen. Umleið 157 starvsfólk á *Havforskningsinstituttet* vóru beinleiðis knýtt afturat havrannsóknaskipum og síðan vóru millum 60 og 30 starvsfólk á hinum støðunum.

Eisini er nakað av virksemi hjá *Havforskningsinstituttet* í Oslo. Bygnaðurin á *Havforskningsinstituttet* skal stimbra samskifti og tryggja skjótt samskifti millum ymsu partarnar av *Havforskningsinstituttet*, eins og at virka verður tvørnámsliga fyri at tryggja heildarmyndina serliga í mun til ráðgeving. Sí annars bygnaðin niðanfyri.




### 3.4.3. Virkisøki

Uppgávurnar hjá *Havforskningsinstituttet* fevna um at:

- Granska hav- og strandarumhvørvið og havlívfrøðina
- Ráðgeva *Nærings- og fiskeridepartementet*, *Fiskeridirektoratet*, *Mattilsynet*, aðrar myndugleikar, fiski- og alivinnu og aðra vinnu, í mun til at umsita hav- og strandartilfeingi og umhvørvi

- Ymiskar tænastur til *Miljødirektoratet*, *Oljedirektoratet*, *Utenriksdepartementet* og aðrar avvarðandi stovnar
- Tilbúgvingarleiklut í sambandi við bráðfeingis hendingar, eitt nú oljulekar, taraendurkveiking, lekar av ymsum slagi í sambandi við alivirksemi
- Ráðgeva í sambandi við fiskirættindasamráðingar
- Luttaka í norskum sendinevndum í sambandi við fiskirættindasamráðingar
- Luttaka í altjóða granskingarsamstarvi
- Luttaka í altjóða ráðgeving til eitt nú ymiskar stovnar undir Sameindu tjóðum, so sum UNEP og UNESCO

# 4. SAMANBERANDI GREINING

Í hesum parti verður ein samanberandi greining gjørd av ávikavist markamótunum millum stjórnarráð og undirskipaðar stovnar og markamótunum millum undirskipaðar stovnar hjá Føroyum, Íslandi og Noregi.

## 4.1. Markamót millum stjórnarráð og undirskipaðar stovnar

Tá ið hugt verður eftir fiskivinnufyrisitingunum í Føroyum, Íslandi og Noregi, kemur tað rættiliga greitt fram, at markamótini millum stjórnarráð og undirskipaðar stovnar eru lík í summum førum og ólík í øðrum førum.

Í Føroyum og Íslandi eru markamótini millum ávikavist Fiskimálaráðið og Vørn og *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* í Reykjavík og *Fiskistofa* í Akureyri rættiliga lík. Í báðum førum liggja allar stýrisuppgávur í vanligum skipanum viðvíkjandi fiskivinnufyrisiting hjá Vørn og *Fiskistofa*, meðan allar stýrisuppgávur í serskipanum liggja hjá Fiskimálaráðnum og *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið*.

Bæði í Føroyum og í Íslandi verður fiskiskapurin skipaður í kunngerðum, sum avvarðandi fiskimálaráðharrar staðfesta og sum ávikavist Vørn og *Fiskistofa* útinna sín myndugleika sambært. Í Føroyum og í Íslandi fer sostatt øll regluskapan fram í ávikavist Fiskimálaráðnum og *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið*.

Eisini kæruskipanirnar í Føroyum og Íslandi eru líkar. Í báðum førum kunnu reiðarafeløg kæra avgerðir í fiskivinnumálum, sum Vørn og *Fiskistofa* hava tikið til ávikavist Fiskimálaráðið og *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið*, sum síðani í fyrisitingini taka endaligar avgerðir í málunum.

Í Noregi hinvegin er skipanin hon, at allar stýrisuppgávur viðvíkjandi fiskivinnufyrisiting eru, uttan mun til um tær eru í vanligum skipanum ella serskipanum lagdar til *Fiskeridirektoratet* í Bergen at sita fyri. Við øðrum orðum, tað er *Fiskeridirektoratet* saman við sínum økisdeildum kring landið, sum situr fyri norsku fiskivinnuni og verða øll viðurskifti við norsk reiðarafeløg greidd har.

Heimildirnar hjá *Fiskeridirektoratet* eru antin ásettar í kunngerðum ella siðvenju, ið er komin til síðani stovnurin var settur á stovn í Bergen í ár 1900 og tá hevði eitt rættiliga leyst tilknýti til Oslo. Í Noregi er tað antin fiskimálaráðharrin ella ein avvarðandi stjóri, sum staðfestir tílíkar kunngerðir.

*Nærings- og fiskeridepartementet* í Oslo hevur yvirskipaðu ábyrgdina av fiskivinnufyrisitingini í Noregi og ásetir í kunngerðum løgfrøðiligar karmar og regluverk,

sum *Fiskeridirektoratet* virkar eftir. *Fiskeridirektoratet* afturímóti hevur víðar heimildir at áseta reglur viðvíkjandi fiskivinnufyrisiting sambært hesum kunngerðum og hevur enntá heimild sambært teimum í ávísum førum eftirfylgjandi at broyta tær í tøkniligum viðurskiftum viðvíkjandi fiskiskapi eitt nú í mun til fiskileiðir, fiskasløg, fiskiskip og veiðiamboð.

Økisdeildirnar hjá *Fiskeridirektoratet* eru fyrstu dyr hjá norsku fiskivinnuni og viðgera tær sostatt øll vanlig mál í mun til reiðarafeløg. Eru norsk reiðarafeløg ósamd um viðgerð og niðurstøðu er vanliga mannagongdin í Noregi í kærumálum hon, at kært verður til *Fiskeridirektoratet*, sum síðani í grundregluni í fyrisitingini tekur endaliga avgerð í málinum.

Hóast hesa skipan kann *Nærings- og fiskeridepartementet* í grundregluni altíð leggja seg út í málsviðgerð hjá *Fiskeridirektoratet*, antin av eintingum ella tí at eitt ávíst reiðarafelag hevur vent sær hagar og at *Nærings- og fiskeridepartementet* heldur tað hava grein í sínum máli. Hinvegin er vanliga mannagongdin hon, at *Fiskeridirektoratet* ráðførir seg altíð í ivamálum við *Nærings- og fiskeridepartementet*, áðrenn avgerð verður tikin í tílíkum málum.

Samanumtikið kann sostatt verða sagt, at Fiskimálaráðið og *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* eru regluskapandi myndugleikar og í stýrisuppgávum í serskipanum útinnandi myndugleikar, meðan Vørn og *Fiskistofa* eru útinnandi myndugleikar í stýrisuppgávum í vanligum skipanum. Hinvegin er *Nærings- og fiskeridepartementet* regluskapandi myndugleiki, meðan *Fiskeridirektoratet* er bæði regluskapandi myndugleiki og í stýrisuppgávum í vanligum skipanum og stýrisuppgávum í serskipanum útinnandi myndugleiki.

Tá ið ræður um markamótini millum Fiskimálaráðið, *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* og *Nærings- og fiskeridepartementet* øðrumegin og ávikavist Havstovuna, *Hafrannsóknastofnun* og *Havforskningsinstituttet* hinumegin, eru tey meinlík. Talan er í øllum trimum førum um vísindaligar stovnar, sum fáast við havlívfrøðiligar tilráðingar til avvarðandi stjórnarráð. Tískil verða hesi markamót ikki viðgjørd nærri.

Sama er støðan viðvíkjandi markamótunum millum Fiskimálaráðið, *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* og *Nærings- og fiskeridepartementet* øðrumegin og ávikavist Vørn, *Landhelgisgæsla Íslands* og *Kystvakta* hinumegin, sum eru meinlík í verki og tískil ikki verða viðgjørd nærri. Her eigur tó at verða viðmerkt, at meðan Vørn er ein undirskipaður stovnur hjá Fiskimálaráðnum er *Landhelgisgæsla Íslands* ein undirskipaður stovnur hjá *Dómsmálaráðuneytið*, meðan *Kystvakta* er ein deild í *Sjøforsvaret*.

## 4.2. Markamót millum undirskipaðar stovnar

Tá ið ræður um markamót millum undirskipaðar stovnar í Føroyum, Íslandi og Noregi kann verða sagt, at tey yvirskipað eru rættiliga lík í uppgávubýtum.

Um vit samanbera tær tríggjar stovnsheildirnar hjá hesum londum, nevniliga Vørn og Havstovan í Føroyum; *Fiskistofa*, *Landhelgisgæsla Íslands* og *Hafrannsóknastofnun* í Íslandi og at enda *Fiskeridirektoratet*, *Kystvakta* og *Havforskningsinstituttet* í Noregi eru allir hesir stovnar í markamótum og sostatt í sínámillum uppgávubýtum líkir.

Við øðrum orðum, talan er um trý grundleggjandi sløg av uppgávum, sum hesir undirskipaðu stovnar býta sínámillum. Tey eru at sita fyri fiskivinnu og hava eftirlit við henni á landi, at hava eftirlit við fiskivinnu á sjónum og loksins at veita havlívfrøðiligar tilráðingar.

Tað er á skipanarliga økinum, at Føroyar víkja frá Íslandi og Noregi, sum hvørt við annað eru meinlík, nevniliga, at Vørn í Føroyum samsvarar við eina samanlagda *Fiskistofa* og *Landhelgisgæsla Íslands* í Íslandi ella eitt samanlagt *Fiskeridirektoratet* og *Kystvakta* í Noregi.

# 5. UPPSKOT TIL FRAMTÍÐAR FISKIVINNUFYRISITING

Í hesum parti verður eitt uppskot til eina framtíðar føroyska fiskivinnufyrisiting tilevnað við íblástri úr íslendsku og norsku fiskivinnufyrisitingunum. Sostatt verður her skotið upp at skipa eina føroyska sjófeingisfyrisiting sum nýggjan stovn undir Fiskimálaráðnum, ið fær dagligu ábyrgdina av at sita fyri føroysku fiskivinnuni. Eftir hesum uppskoti, eins og greitt verður frá niðanfyri, fer ein framtíðar føroysk fiskivinnufyrisiting tískil at fevna um Fiskimálaráðið sum yvirskipaðan myndugleika og nýstovnaða sjófeingisfyrisiting, Vørn og Havstovuna sum undirskipaðar stovnar.

## 5.1. Fiskimálaráðið

Sambært uppskotinum verður Fiskimálaráðið skipað av nýggjum sum eitt "reint" stjórnarráð, har allar stýrisuppgávur verða lagdar til eina nýstovnaða sjófeingisfyrisiting, uttan mun til um tær eru í vanligum skipanum ella serskipanum. Harumframt verða øll kærumál løgd til kærunevnd.

Tað hevur í høvuðsheitum við sær, at Fiskimálaráðið fer á sínum málsøkjum burturav at standa fyri *policymaking*, lógarfyrireiking, kunngerðarsmíð, altjóða samvinnu, heruppií altjóða samráðingum, og øðrum virksemi, sum eftir vanligari fatan liggur hjá einum stjórnarráði.

Í einum nýskipaðum Fiskimálaráði fara politisku mál fiskimálaráðharrans og landsstýrisins sostatt at fáa størri rúmd og raðfesting og verða meira sjónlig í samfelagnum vegna tess at:

- Daglig málsviðgerð í mun til borgarar, felagsskapir og vinnufeløg fær minni rúmd eftir avhending til eina nýstovnaða sjófeingisfyrisiting sambært fyriskipan.

- Kærumál frá borgarum, felagsskapum og vinnufeløgum fáa minni rúmd eftir at tey verða løgd til kærunevnd sambært lóg.

- Mál, ið hava við framtíð og menning at gera verða raðfest og sett í hásæti.

- Altjóða samvinna verður somuleiðis raðfest og sett í hásæti.

Nú Fiskimálaráðið er eitt av landsins minstu stjórnarráðum við aðalstjóra og einans fimtan starvsfólkum í føstum størvum og eftir hesum uppskoti verður skorið nakað niður

í starvsfólkatali eftir at ávíst starvsfólkatilfeingi verður flutt í eina nýstovnaða sjófeingisfyrisiting verður hildið sum meginuppskot, at ráðið átti heldur at verðið skipað við toymum enn deildum.

Í slíkari toymisskipan verða uppgávurnar í Fiskimálaráðnum, ið natúrliga hoyra saman lagdar sum øki í hvørt toymi sær. Við øðrum orðum, Fiskimálaráðið kundi hóskandi verðið skipað við hesum toymum:

1. Eitt fiskivinnutoymi, ið fær ábyrgdina av at ráðgeva í *policymaking*, at fyrireika lógaruppskot, at fyrireika uppskot til kunngerðir, at standa fyri dagliga samskiftinum á sínum øki við Havstovuna og eina nýstovnaða føroyska sjófeingisfyrisiting, umframt at takast við onnur mál, sum stinga seg upp í Fiskimálaráðnum á fiskivinnuøkinum.

2. Eitt landbúnaðartoymi, ið fær ábyrgdina av at ráðgeva í *policymaking*, at fyrireika lógaruppskot, at fyrireika uppskot til kunngerðir, at standa fyri dagliga samskiftinum á sínum øki við Búnaðarstovuna og Búnaðargrunnin, umframt at takast við onnur mál, sum stinga seg upp í Fiskimálaráðnum á landbúnaðarøkinum.

3. Eitt tilbúgvingartoymi, ið fær ábyrgdina av at ráðgeva í *policymaking*, at fyrireika lógaruppskot, at fyrireika uppskot til kunngerðir, at standa fyri dagliga samskiftinum á sínum øki við Vørn og allar aðrar avvarðandi leikarar innan tilbúgving í Føroyum, umframt at takast við onnur mál, sum stinga seg upp í Fiskimálaráðnum á tilbúgvingarøkinum.

4. Eitt fíggjartoymi, ið fær ábyrgdina av øllum innanhýsis viðurskiftum í Fiskimálaráðnum eitt nú fíggjarlógarfyrireiking, játtanareftirliti, hølisviðurskiftum, KT-skipanum, skjalaskráseting, bókhaldi, heimasíðum, umframt skipanarligum viðurskiftum við undirskipaðar stovnar hjá Fiskimálaráðnum.

5. Eitt HR-toymi, ið fær ábyrgdina av starvsfólkaviðurskiftum og at skipa fyri starvsfólkamenning og røkt.

6. Hitt føroyska samráðingartoymið, ið varð skipað í Fiskimálaráðnum á sumri 2013, heldur fram sum óbroytt og fær eftir hesum uppskoti ábyrgdina av øllum altjóða samráðingum, sum Fiskimálaráðið varðar av, eitt nú strandarlandasamráðingum,

tvíliðaðum samráðingum um fiskirættindi og samráðingum í økisfelagsskapum fyri fiskivinnuumsiting.

Við omanfyristandandi í huga verður tískil skotið upp, at bygnaðurin í einum nýskipaðum Fiskimálaráði verður ásettur eins og endurgivin niðanfyri.




Í eini toymisskipan sum hesari í uppskoti omanfyri vísa starvsfólkini í Fiskimálaráðnum skipanarliga til aðalstjóran og starvsliga til avvarðandi toymisleiðara. Toymisleiðararnir vísa bæði skipanarliga og starvsliga til aðalstjóran. Eisini ganga starvsfólkini aftur antin

sum toymisleiðarar, toymissamskiparar ella toymislimir í teimum ymsu toymunum. Við øðrum orðum, í førum har tað er fullgott fyri Fiskimálaráðið og tað einstaka starvsfólkið, kann tað starvsfólkið í grundregluni verða toymisleiðari í einum toymi, toymissamskipari í einum øðrum toymi og toymislimur í einum triðja toymi.

Sostatt verður lagt upp til eina elviliga og mennandi skipan, har starvsfólk kunnu taka avbjóðingar á seg antin sum toymisleiðarar, toymissamskiparar ella toymislimir í teimum ymsu toymunum í einari broytiligari samanseting í tann mun støðan í Fiskimálaráðnum tilskilar tað og ynski hjá tí einstaka starvsfólkinum um ávísa yrkisleið somuleiðis er lokið.

Umframt omanfyri uppskotnu toymisskipan verður eisini skotið upp, at skrivari fiskimálaráðharrans og samskiparin í fiskivinnugransking verða skipað sum serstøk størv í Fiskimálaráðnum, har skrivarin vísir skipanarliga til aðalstjóran og starvsliga til fiskimálaráðharran, meðan samskiparin vísir bæði skipanarliga og starvsliga til aðalstjóran.

Flestu stjórnarráð í Føroyum hava leiðslufundir, deildarfundir og starvsfólkafundir. Tað er eisini verandi skipan í Fiskimálaráðnum. Sum áður umrøtt er Fiskimálaráðið við aðalstjóra og einans fimtan starvsfólkum eitt av landsins minstu stjórnarráðum og verður eftir hesum uppskoti enntá skorið nakað niður í starvsfólkatali.

Tískil verður ikki hildið, at tað er burðardygt fyri ta samlaðu starvsfólkaorkuna í ráðnum at hava bæði leiðslufundir, deildarfundir og starvsfólkafundir á einum so lítlum starvsfólkagrundarlagi. Av hesi orsøk verður skotið upp at leggja nevndu tríggjar fundir saman í ein vikuligan ráðsfund, har øll luttaka. Eftir hesi skipan hava ymsu toymini harafturat javnan toymisfundir, har aðalstjóri og/ella fiskimálaráðharri verða bodnir á fund eftir tørvi og øvugt.

Tað er ikki sørt lítið at ivast í, at toymisskipanin í uppskoti í mun til verandi deildarskipan í Fiskimálaráðnum hevur eisini við sær aðrar fyrisitingarligar fyrimunir. Tveir grundleggjandi høvuðsfyrimunir mega vera nevndir í hesum sambandi. Tann eini høvuðsfyrimunurin er, at “vit” og “tit” mentanin, sum er rættiliga vanlig í eini og hvørjari deildarskipan fer at vera meira fjar, samstundis sum starvsfólkini fara at hugsa og síggja seg meira sum eitt samansjóðað felagslið í Fiskimálaráðnum. Hin høvuðsfyrimunurin er, at líkindi vera til eina munandi størri vitanarspjaðing millum starvsfólkini í Fiskimálaráðnum, nú tey ganga aftur í fleiri toymum í eini blandingsskipan.

---

Sum hjáuppskot verður hildið, at tað ber eisini til at gera tillagingar í verandi deildarskipan í Fiskimálaráðnum heldur enn at fara til eina fullfloygda toymisskipan. Ein grundleggjandi høvuðsgrundgeving kundi verið, at tá ið hugsað verður um starvsliga tilvísingar eina, vera tað heilir seks toymisleiðarar, sum í tí dagliga fara at vísa beinleiðis til aðalstjóran, umframt samskiparan í fiskivinnugransking. Sostatt kann aðalstjórastarvið gerast alt ov margfalt og strongt.

Í eini deildarskipan í Fiskimálaráðnum, sum tillagað, verður sostatt skotið upp, at bygnaðurin verður skipaður eins og endurgivin niðanfyri.




Í uppskotnu deildarskipanini í Fiskimálaráðnum omanfyri, sum tillagað, verða sostatt tríggjar deildir, nevniliga ein altjóðadeild, ein tilfeingisdeild og ein fíggjardeild. Ábyrgdarbýtið millum deildirnar verður lýst niðanfyri í samanbering við fyrr uppskotnu toymisskipanina.

1. Altjóðadeildin fær ábyrgdina av samsvarandi málum sum hitt føroyska samráðingartoymið, nevniliga ábyrgdina av øllum altjóða samráðingum, ið Fiskimálaráðið varðar av, eitt nú strandarlandasamráðingum, tvíliðaðum samráðingum um fiskirættindi og samráðingum í økisfelagsskapum fyri fiskivinnuumsiting.

2. Tilfeingisdeildin fær ábyrgdina av samsvarandi málum sum fiskivinnutoymið og landbúnaðartoymið, nevniliga ábyrgdina av at ráðgeva í *policymaking*, at fyrireika

lógaruppskot, at fyrireika uppskot til kunngerðir, at standa fyri dagliga samskiftinum á sínum øki við Havstovuna, eina nýstovnaða føroyska sjófeingisfyrisiting, Búnaðarstovuna og Búnaðargrunnin, umframt at takast við onnur mál, ið stinga seg upp í Fiskimálaráðnum á fiskivinnuøkinum og landbúnaðarøkinum.

3. Fíggjardeildin fær ábyrgdina av samsvarandi málum sum HR-toymið, fíggjartoymið og tilbúgvingartoymið, nevniliga ábyrgdina av starvsfólkaviðurskiftum og at skipa fyri starvsfólkamenning og røkt; ábyrgdina av øllum innanhýsis viðurskiftum í Fiskimálaráðnum eitt nú fíggjarlógarfyrireiking, játtanareftirliti, hølisviðurskiftum, KT-skipanum, skjalaskráseting, bókhaldi, heimasíðum, umframt skipanarligum viðurskiftum við undirskipaðar stovnar hjá Fiskimálaráðnum og at enda ábyrgdina av at ráðgeva í *policymaking*, at fyrireika lógaruppskot, at fyrireika uppskot til kunngerðir, at standa fyri dagliga samskiftinum á sínum øki við Vørn og allar aðrar avvarðandi leikarar innan tilbúgving í Føroyum, umframt at takast við onnur mál, ið stinga seg upp í Fiskimálaráðnum á tilbúgvingarøkinum.

Eins og í uppskotnu toymisskipanini verða í uppskotnu deildarskipanini skrivari fiskimálaráðharrans og samskiparin í fiskivinnugransking skipað sum serstøk størv í Fiskimálaráðnum, har skrivarin vísir skipanarliga til aðalstjóran og starvsliga til fiskimálaráðharran, meðan samskiparin vísir bæði skipanarliga og starvsliga til aðalstjóran.

Harumframt heldur skipanin við leiðslufundum, deildarfundum og starvsfólkafundum fram óbroytt í uppskotnu deildarskipanini í Fiskimálaráðnum.

## 5.2. Sjófeingisfyrisiting

Fiskivinnunýskipanin sum kjølfest í nýggjari sjófeingislóg fer at hava nógvar nýggjar uppgávur við sær og broyta virksemið hjá verandi fiskivinnufyrisiting munandi.

Tað er serliga við hesum veruleika í huga, at skotið verður upp at seta eina føroyska sjófeingisfyrisiting á stovn, sum fær ábyrgdina av øllum stýrisuppgávum bæði teimum í vanligum skipanum og teimum í serskipanum.

Í hesum sambandi eigur eisini at vera havt í huga, hvussu okkara grannalond hava raðfest sínar sjófeingisfyrisitingar. Í Íslandi er lutfallið í starvsfólkum í fiskivinnumálum millum *Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið* øðrumegin, og *Fiskistofa* hinumegin, 1:6, meðan í Noregi er lutfallið í starvsfólkum í fiskivinnumálum millum *Nærings- og*

*fiskeridepartementet* øðrumegin, og *Fiskeridirektoratet* hinumegin, 1:11. Í Føroyum afturímóti, er lutfallið í starvsfólkum í fiskivinnumálum millum Fiskimálaráðið øðrumegin, og Vørn hinumegin, 1:0,7.

Havast skal í huga, at tá ið heitið sjófeingisfyrisiting verður brúkt í uppskotinum skal tað ikki vera at skilja sum eitt uppskot til endaligt stovnsheiti, men heldur eitt ávegis hugtak til at lýsa eitt uppskot til ein framtíðar stovn undir Fiskimálaráðnum. Fleiri uppskot til stovnsheiti kundu verið uppá tal eitt nú sum sagt "sjófeingisfyrisiting", ella í styttri líki "sjófeingi", samanber Jarðfeingi, "fiskivinnustýri" ella "fiskivinnustova".

Skotið verður upp, at ein føroysk sjófeingisfyrisiting fær ein bygnað sum umframt stjóra fevnir um eina tænastueind, nevniliga fyrisitingareind, og tríggjar deildir, nevniliga eftirlitsdeild, loyvis- og hagtalsdeild, og KT- og samskiftisdeild.

Sostatt verður skotið upp, at bygnaðurin verður skipaður eins og endurgivin niðanfyri.




## 5.2.1. Stjórin

Stjórin hevur yvirskipaðu leiðsluna og ábyrgdina av sjófeingisfyrisitingini. Hann skipar og mennir stovnin ígjøgnum sína leiðsluheimild frá Fiskimálaráðnum til tess at alt tilfeingi stovnsins kann verða nýtt á ein munadyggan og burðardyggan hátt.

Sum ovasti leiðari á sjófeingisfyrisitingini útinnir stjórin eisini í verki avvarðandi ásetingar í sjófeingislóg innanfyri heimildirnar, sum honum eru tillutaðar frá Fiskimálaráðnum.

### 5.2.2. Fyrisitingareindin

Í fyrisitingareindini vera øll innanhýsis viðurskifti í sjófeingisfyrisitingini eitt nú fíggjarviðurskifti, starvsfólkaviðurskifti, hølisviðurskifti, skjalaskráseting og bókhald.

Harumframt virkar fyrisitingareindin sum skrivstova hjá stjóranum við fíggjarfulltrúa og skrivstovufólkum.

### 5.2.3. Eftirlitsdeildin

Í eftirlitsdeildini verður føroyska fiskiveiðieftirlitið fyrisitið og framt samsvarandi sjófeingislóg. Hóast sjófeingisfyrisitingin verður eftirlitsmyndugleikin bæði á sjógvi og landi fara eftirlitsmenninir á deildini fyrst og fremst at fremja sínar eftirlitsuppgávur á landi eitt nú tá ið fiskifør landa í Føroyum ella uttanlands, meðan Vørn vegna sjófeingisfyrisitingina og í samstarvi við hana fer at fremja eftirlitsuppgávurnar á sjónum við undantakið av verksmiðjuskipum, har eftirlitsfólk frá sjófeingisfyrisitingini fara at fremja eftirlitið við framleiðslunum umborð.

Í altjóða samráðingum og samstarvi um fiskirættindi fara starvsfólk frá eftirlitsdeildini at verða umboðaði í føroyskum sendinevndum sum serfrøðingar í eftirlitsmálum.

Við nýggju sjófeingislógini verður stóra broytingin á eftirlitsøkinum hon, at farið verður frá fiskidagaskipan til eina kvotaskipan fyri øll fiskifør, undantiknir bólkarnir 4, 4T og 5. Tað broytir virksemið hjá eftirlitinum munandi. Størri vandi verður fyri útblaking, slepping og skiljing, og tískil er neyðugt við øktari orku og fleiri eftirlitsfólkum til at hava eftirlit við hesum og krevur tað samsvarandi fíggjarliga raðfesting.

### 5.2.4. Loyvis- og hagtalsdeildin

Í loyvis- og hagtalsdeildini verður loyvisskipanin fyrisitin og framd. Deildin fevnir sostatt um uppgávurnar at skriva út loyvi til loyvishavarar, at skipa fyri uppboðssølum, at halda skil á øllum formligum viðurskiftum í fiskivinnuni, eitt nú loyvum í mun til miðsavnan og í tí sambandinum at savna saman upplýsingar um reiðarafeløg, fiskifør og fiskiskap til tess at gera hagtøl um ávikavist ognarviðurskifti og veiðu, umframt onnur viðkomandi viðurskifti.

Í altjóða samráðingum og samstarvi um fiskirættindi fara starvsfólk frá loyvis- og hagtalsdeildini at verða umboðaði í føroyskum sendinevndum sum serfrøðingar innan fyrisiting av sjófeingi.

Deildin fær eisini ábyrgdina av at skipa fiskiskapin í mun til stongdar leiðir eitt nú at seta bráðfeingis veiðibann í gildi fyri ávísan fiskiskap, heruppií at stongja ávísar leiðir.

Harumframt fær deildin ábyrgdina av stýrisuppgávum í serskipanum eitt nú at sita fyri royndarfiskiskapi eftir ávísum fiskasløgum og at sita fyri menningarkvotum.

Samanumtikið fer deildin at fáa fleiri heimildir til at áseta ítøkiligar reglur fyri føroyskan fiskiskap innanfyri karmin av kunngerðum, sum verða smíðaðar eftir nýggju sjófeingislógini.

Við sjófeingislógini verður ein tann størsta broytingin í mun til verandi lóg um vinnuligan fiskiskap, at rættindi fyri tey størru skipini ikki longur verða knýtt afturat einum fiskifari. Tað førir við sær, at øll telduskipanin og mannagongdir annars skulu broytast, tí alt virksemi higartil er grundað á fiskifør.

Samstundis kann roknast við, at tað verða fleiri leikarar í fiskivinnuni, og sostatt skulu ognarviðurskiftini eftirkannast í fleiri reiðarafeløgum enn nú. Slíkt krevur ofta drúgva viðgerð, sum aftur krevur nógva orku. Við øðrum orðum, skil skal bæði haldast á hvør hevur hvørji rættindi og hvørji fiskifør hava hvørji fiskiloyvi.

Við sjófeingislógini verða eisini reglurnar um miðsavnan broyttar munandi í mun til verandi lóg um vinnuligan fiskiskap. Hámark verður sett fyri samlaðu rættindini hjá hvørjum reiðarafelag sær, bæði av samlaða fiskiskapinum og í einstøkum bólkum. Tað førir eisini við sær eyka orku og virksemi.

### 5.2.5. KT- og samskiftisdeildin

Í KT- og samskiftisdeildini verða skipanir mentar og viðlíkahildnar, sum eru neyðugar fyri at skipa føroyska fiskiskapin. Serliga verður hugsað um skipanir í serritbúnaði, ið fevna um loyvishavarar antin sum einstaklingar ella feløg, kvotur, fiskidagar og fiskifør teirra, umframt veiðu.

Hugsandi verður ein telduskipan ment við einum netdepli, har hvørt reiðarafelag fær sína egnu vangamynd, ein "mín síða" við øllum viðkomandi virksemi og hagtølum fyri fiskifør, kvotur, fiskidagar, dagførda veiðu í tonsatali á fiskasløg, umframt upplýsingum, sum kunnu siga, um felagið gongur ásetingunum um miðsavnan og øðrum viðurskiftum ov nær.

Bæði í Íslandi og Noregi løgdu heimildarfólkini dent á hvussu týdningarmikið tað er at hava innanhýsis KT-fólk, tá ið tað ræður um at forrita serritbúnað, dagføra, menna og halda hann við líka til eina nútíðarliga sjófeingisfyrisiting. Harumframt vísti tað seg at vera bæði munandi tryggari og minni kostnaðarmikið at hava KT-fólkini starvssett á stovninum heldur enn at knýta seg og binda seg afturat einari ávísari KT-fyritøku langt fram í tíðina.

Í KT- og samskiftisdeildini vera harafturat allar samskiftisskipanir hjá sjófeingisfyrisitingini eitt nú heimasíða stovnsins sum miðlar týðandi upplýsingar um stovnin og virksemi hansara.

Eisini fevnir heimasíðan um dagførdar upplýsingar um loyvishavarar, uppboðssølur, kvotur, fiskidagar, fiskifør og veiðihagtøl sum amboð at skipa føroyska fiskiskapin og at fullkunna borgaran.

Samanumtikið verður tí hildið, at serkøn starvsfólk eiga at verða sett í starv, ið hava skil fyri hagfrøði, forritan og miðling samstundis sum samstarvið við avvarðandi KT-fyritøkur verður gjørt upp á hesum øki. Sum áður sagt verður mett, at meira fæst fyri játtanina um serkøn starvsfólk verða sett í fast starv at taka sær av hesum viðurskiftum. Somuleiðis verður hildið, at umsitingarparturin, eitt nú samskiftis- og skrivstovuforrit, eiga at verða innlimað í Landsnet.

## 5.3. Vørn

Í uppskotinum verður lagt upp til, at Vørn verður í størstan mun ein "rein" vaktar- og bjargingartænasta *(coastguard)* eins og í grannalondum okkara og aðrastaðni í heiminum. Vørn fer sostatt at halda fram at vera "løgreglan" á sjónum og uppihalda føroyska lóg har, serstakliga innanfyri sjóvinnu, sjófeingi, jarðfeingi og umhvørvi, umframt at standa á odda fyri tilbúgving, leiting, bjarging og øðrum seruppgávum eitt nú sleiping.

Sum fyrr umrøtt, verður ein týðandi lutur í virkseminum hjá Vørn at fremja fiskiveiðieftirlit á sjónum í samstarvi við sjófeingisfyrisitingina sum avvarðandi myndugleika. Tað er tí sera umráðandi, at vaktarskipini verða fíggjarliga raðfest til tess, at tey til eina og hvørja tíð kunnu verða fullvirkin á føroyskum havleiðum og somuleiðis endurnýggjaði, tá ið áneyðir eru fyri tí.

Við hesi broyting verður meginluturin av starvsfólkatilfeinginum hjá Vørn á landi fluttur til sjófeingisfyrisitingina. Í grundregluni verður talan um starvsfólk og játtan hjá løgdeildini, deildini fiskiveiðieftirlitið og lutvíst fíggjardeildini, sum verða flutt og síðani

býtt millum deildirnar eftirlitsdeildin og loyvis- og hagtalsdeildin, umframt fyrisitingareindin í sjófeingisfyrisitingini.

Hóast hesa broyting verður starvsfólkatilfeingi á landi, sum er beinleiðis knýtt afturat rakstrinum av vaktarskipunum hjá Vørn ikki flutt úr stovninum. Heldur ikki verða nakrar broytingar uppskotnar í mun til aðrar deildir í bygnaðinum hjá Vørn. Eftir broytingina verður bygnaðurin hjá Vørn sum niðanfyri lýstur.




## 5.4. Havstovan

Í hesum uppskoti verður lagt upp til, at Havstovan skipanarliga og bygnaðarliga heldur fram óbroytt.

Tá ið ræður um samstarvið millum Havstovuna og Fiskimálaráðið í altjóða samráðingum um fiskirættindi eigur at verða umhugsað, um ein serlig játtan eigur at verða sett á stovn hjá Havstovuni til hesar samráðingar.

Somuleiðis fer ein nýggj sjófeingislóg at krevja munandi meira av Havstovuni í mun til stovnsrøkt á føroyskum havleiðum og eigur tískil eisini at verða umhugsað at raðfesta hetta øki samsvarandi.

Við øðrum orðum, við nýggju sjófeingislógini verður Havstovuni álagt nógvar nýggjar uppgávur, heruppií gransking, stovnsmeting og ráðgeving um at umsita sjófeingi.

Eisini verður lagt upp til fleiri kanningar av føroyska sjófeinginum og tess umhvørvi, menning av reiðskapi, øktum samstarvi við vinnuna, eitt nú eitt samstarvsráð og greiðari mannagongdir fyri ráðgeving um stovnsrøkt og umsiting av burðardyggari fiskivinnu.

Í hesum sambandi skal Havstovan gera tilmæli um mest loyvdu veiðu við støði í langtíðar umsitingarætlanum eins og fiskidagatal skal ásetast fyri bólkarnar 4, 4T og 5.

Sostatt verður lagt upp til, at Havstovan ger eina støðulýsing av fiskastovnum og havumhvørvinum, eins og eitt tilmæli um mest loyvdu veiðu fyri hvønn einstakan stovn við støði í langtíðar umsitingarætlanum, umframt onnur havlívfrøðilig tilmæli.

Fyri bólkarnar 4, 4T og 5 verður lagt upp til, at Havstovan ger eina árliga eftirmeting av, hvussu nógv fiskiførini undir fiskidagaskipanini hava ávirkað veiðitrýstið, treytað av, at hagtalsgrundarlagið undir tí brúkta fiskidagatalinum og veiðuni eru nøktandi.

Sum áður nevnt fara hesi átøk sum heild at krevja eina avgerandi og munandi fíggjarliga raðfesting til Havstovuna og er tað serliga botnfiskadeildin talan verður um.

## 5.5. Samanumtøka

Undir viðgerðini av hesum uppskoti til eina framtíðar føroyska fiskivinnufyrisiting hevur spurningurin verið settur, um tað yvirhøvur er neyðugt at skipa ein nýggjan stovn undir Fiskimálaráðnum. Í hesum sambandi hevur eisini verið ført fram, at tilgongdin at flyta stýrisuppgávur út úr Fiskimálaráðnum er longu framd við fiskiloyvum og veiðiloyvum til Vørn.

Tað er lítið at ivast í, at flytingarnar av stýrisuppgávum í vanligum skipanum eitt nú fiskiloyvum og veiðiloyvum frá Fiskimálaráðnum til Vørn hava havt stórar broytingar við sær bæði fyri Fiskimálaráðið sum yvirskipaðan myndugleika og Vørn sum undirskipaðan stovn. Í Fiskimálaráðnum eru eisini stýrisuppgávur eftir, sum ikki eru fluttar úr ráðnum og verður her serliga hugsað um stýrisuppgávur í serskipanum eitt nú royndarfiskiskapur eftir ávísum fiskasløgum og menningarkvotur, umframt umboðan í altjóða samráðingum um fiskirættindi á serfrøðingastøði. Afturat hesum koma so øll kærumálini, sum tó ikki eru stýrisuppgávur.

Tað er ein sannroynd, at heimildarfólkini úr Íslandi og Noregi, ið hava veitt holl ráð í tilevningini av hesum uppskoti hava ikki verið í iva. Skal ein fiskivinnutjóð hava eina støðuga og trygga fyrisiting av sjófeingi, ið er grundfest í meginregluni um løgræði, er

neyðugt at hava ein vælskipaðan stovn undir Fiskimálaráðnum, sum burturav hevur dagligu ábyrgdina av hesum øki.

Í viðgerðini er tað eisini komið greitt fram, at líkindi eru til, at tað neyvan hevur verið ein fullgóð tilgongd at flyta stýrisuppgávur frá Fiskimálaráðnum til Vørn. Eisini er ivi sáddur um, hvørt tað er skilagott, at føroyska fiskiveiðieftirlitið liggur í Vørn. Sum áður umrøtt eigur Vørn at vera burturav ein vaktar- og bjargingartænasta og sostatt ikki ein stovnur, sum situr fyri sjófeingi. Við øðrum orðum, tað bendir tískil ikki sørt á, at uppgávurnar hjá Vørn, ið gjørdust alt ov margfaldar, tá ið avtornaði, kunnu hava strongt stovnin avgerandi í týðandi málum samstundis sum stovnurin hevur verið fyri stórum sparingum á fíggjarlógini tey nógvu seinnu árini.

Tað er á hesum støði, at skotið verður upp at skipa eina føroyska sjófeingisfyrisiting sum sjálvstøðugan stovn undir Fiskimálaráðnum og mega fyrimunirnir sigast at vera avgerandi fleiri í tali enn vansarnir. Eisini eigur at vera havt í huga, at tá ið landbúnaðurin hevur sín egna stovn, nevniliga Búnaðarstovuna og oljuvinnan somuleiðis sín egna stovn, nevniliga Jarðfeingi, so átti fiskivinnan sum høvuðsvinna í Føroyum eisini at havt sín egna stovn.

Lat tað tó verða sligið fast, at hóast ein føroysk sjófeingisfyrisiting verður skipað undir Fiskimálaráðnum sum sjálvstøðugur stovnur og fær ábyrgdina av at sita fyri tí føroyska sjófeinginum, so verður tað framvegis fiskimálaráðharrin, ið sambært stýrisskipan Føroya, sum hevur evstu ábyrgdina av økinum.

Nú føroyska fiskivinnufyrisitingin er ein samanhangandi heild verður eisini neyðugt at taka stigið fult út og skipa bygnaðin í Fiskimálaráðnum av nýggjum. Sum áður umrøtt, kann tað antin gerast í einari toymisskipan ella einari deildarskipan sum tillagað.

# 6. UPPSKOT TIL VERKSETANARÆTLAN

Í hesum parti verður ein lýsing framd av teimum átøkum, ið skulu til fyri at seta í verk eina framtíðar føroyska fiskivinnufyrisiting. Átøkini verða lýst í stigum niðanfyri.

1. Upprit um eina framtíðar føroyska fiskivinnufyrisiting verður fyrireikað og lagt fram á landsstýrisfundi til politiska støðutakan. Høvuðsmálið í uppritinum verður at seta á stovn eina føroyska sjófeingisfyrisiting sum ein nýggjan sjálvstøðugan stovn undir Fiskimálaráðnum.

2. Ein fyribilssettur stjóri verður settur á sjófeingisfyrisitingini. Hann fær ábyrgdina av at skipa stovnin og saman við aðalstjóranum í Fiskimálaráðnum og stjóranum á Vørn at fremja tilgongdina í verki.

3. Aðalstjórin í Fiskimálaráðnum ásetir í samráð við stjóran á Vørn og fyribilssetta stjóran á nýstovnaðu sjófeingisfyrisitingini nýggju markamótini millum Fiskimálaráðið, Vørn og nýstovnaðu sjófeingisfyrisitingina. Ásetan av nýggjum markamótum fevnir um:

    a. At býta virkisøkið av nýggjum millum Fiskimálaráðið og nýstovnaðu sjófeingisfyrisitingina, har tær síðstu stýrisuppgávurnar viðvíkjandi fiskivinnumálum í Fiskimálaráðnum verða fluttar í nýstovnaðu sjófeingisfyrisitingina.

    b. At býta virkisøkið av nýggjum millum Vørn og nýstovnaðu sjófeingisfyrisitingina, har fiskiveiðieftirlit á landi og fyrisiting av sjófeingi annars verða flutt í nýstovnaðu sjófeingisfyrisitingina.

    c. At býta starvsfólkatilfeingið av nýggjum, har ávíst tal av starvsfólkum í Fiskimálaráðnum verður flutt í nýstovnaðu sjófeingisfyrisitingina. Leiðslan í Fiskimálaráðnum eigur at nágreina ítøkiliga hesa flyting, áðrenn nøkur stig verða tikin.

    d. At býta starvsfólkatilfeingið av nýggjum, har ávíst tal av starvsfólkum í Vørn verða flutt í nýstovnaðu sjófeingisfyrisitingina samsvarandi starvsfólkatalinum í løgdeildini, deildini fiskiveiðieftirlitið og lutvíst fíggjardeildini samanlagt.

e. At gera uppskot til nýggja høvuðskontu – Sjófeingisfyrisitingin – undir § 5 Fiskivinnumál á løgtingsfíggjarlógini, har ein ávís raðfesting samsvarandi nýggjum krøvum sambært sjófeingislógini á 3,5 mió. kr. verður framd. Ítøkiliga er talan um ein stjóra á 700 tkr., tvey skrivstovufólk á 600 tkr., tvey eftirlitsfólk á 800 tkr., tvey KT-fólk á 900 tkr. og ein KT- og hagfrøðing á 500 tkr. Harumframt verða flytingar samsvarandi omanfyrinevndu starvsfólkaflytingum og íroknaðum útreiðslum frá ávikavist høvuðskontu 5.11.1.05. Fiskimálaráðið (Rakstrarjáttan) og høvuðskontu 5.34.2.01. Fiskiveiðieftirlitið (Rakstrarjáttan) til nýstovnaða høvuðskontu Sjófeingisfyrisitingin. Leggjast skal eisini uppfyri, at KT-útreiðslurnar hjá Vørn í dag til KT-fyritøkur, sum ítøkiliga fara til serritbúnað og KT-stuðul eru áleið 1,5 mió. kr. árliga. Tær verða eftir hesi ætlan spardar burtur í longdini.

f. At nýstovnaða sjófeingisfyrisitingin í fyrstu atløgu yvirtekur bygningin hjá Vørn Yviri við Strond 3 til møguliga onnur varandi loysn er funnin, samstundis sum stjórin á Vørn saman við starvsfólkum beinleiðis knýttum afturat rakstrinum av vaktarskipum flyta í annan bygning hjá Vørn.

4. Ein raðfesting á 1,5 mió. kr. verður framd á høvuðskontu 5.34.3.01. Havstovan (Rakstrarjáttan) samsvarandi nýggjum krøvum sambært sjófeingislógini. Ítøkiliga er talan um ein granskara til botnfiskadeild á 600 tkr., 1,3 havlívfrøðiligan atstøðing á 600 tkr. og 0,5 granskara til uppsjóvardeild á 300 tkr.

5. Lýst verður eftir stjóra til sjófeingisfyrisitingina. Talan er um eitt stjórastarv, ið er sera týdningarmikið fyri føroysku høvuðsvinnuna og samstundis eitt av teimum mest ábyrgdarfullu størvunum hjá landinum á stovnsstigi eins og tað altíð fer at hava stóran politiskan áhuga millum fólk. Tískil verður hildið, at starvið eigur at verða eitt tænastumannalíknandi starv í 38. lønarflokki við møguleika at verða áramálssett við teimum tillagingum, sum í tí liggur.

6. Kærumálini hjá Fiskimálaráðnum verða løgd til kærunevnd sambært lóg.

7. Bygnaðurin í Fiskimálaráðnum verður skipaður av nýggjum antin í einari toymisskipan ella einari deildarskipan sum tillagað.

# HEIMILDARFÓLK

**Ísland**

Annas Jón Sigmundsson, ráðgjafi, Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið

Guðmundur Rúnar Jónsson, varðstjóri, Landhelgisgæsla Íslands

Halldór B. Nellett, skipherra, Landhelgisgæsla Íslands

Jóhann Guðmundsson, skrifstofustjóri, Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið

Sigurgeir Þorgeirsson, ráðgjafi, Atvinnuvega- og nýsköpunarráðuneytið

Þorsteinn Hilmarsson, sviðsstjóri, Fiskistofa

Þorsteinn Sigurðsson, sviðsstjóri, Hafrannsóknastofnun

**Noreg**

Aksel Eikemo, direktør for Ressursavdelingen, Fiskeridirektoratet

Jonny Høgset, fiskerioffiser, Kystvakta

Kjell Nedreaas, forsker fiskeridynamikk, Havforskningsinstituttet

Olav Lekve, kommunikasjonsdirektør, Fiskeridirektoratet

Per Sandberg, direktør for Statistikkavdelingen, Fiskeridirektoratet

Vidar Landmark, ekspedisjonssjef, Nærings- og fiskeridepartementet

**Føroyar**

Jan Klein Olsen, løgfrøðingur, Vørn

Jóhan Hendrik Ellefsen, løgfrøðingur, Vørn

Jóhan Simonsen, deildarstjóri, Vørn